# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG
03
10









www. pedagogfelag. fo

# Úr innihaldinum


Oddagrein . 2
Tíðindi frá felagnum . 4
Skeið fyri álitisfólk
og leiðarar/varaleiðarar . 5
Barsil . 6
Álitisfólkafundur . 8
Leiðarafundur . 9
Kunning
til nýggju pedagogarnar . 10
Felagsins Aktións-
og upplýsingargrunnur . 11
Eftirlønarreformurin . 12
Svarskriv . 12
Tað er lív í Lív . 14
At lýsa alment . 16
Bókstavalæra við rørslu . 19
Eykaðalfunduri . 21
Uppskot til lógarbroytingar . 21
Hugsa hart! . 25
Margarinfabrikkin . 28
Góðar royndir av Marte Meo . 31
Menna samspæl
millum brúkara og starvsfólk . 32
Marte Meo ger mun . 33
Ein íløga í framtíðina . 34
Stórt frambrot við nýggja
dagstovninum . 35
Góður karmur um
mennandi innihald . 36
Umhvørvisátak
við arbeiðsskapandi burturkasti . 38
Spennandi avbjóðingar
við nýggjum og øðrvísi krøvum . 40


# KOLOFON


**ÚTGEVARI:**
Føroya Pedagogfelag, Postboks 318
110 Tórshavn – Tlf. 35 75 76 – Fax 35 75 73
pedagog@pedagogfelag.fo – www. pedagogfelag.fo
**LAGT TIL RÆTTIS:** Sp/f Rit & Ráð
Tel. 22 92 42 – www. ritrad.fo
**UMBRÓTINGING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ:**
Føroyaprent – www. foroyaprent.fo
**ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRI:** Muad Wang Hansen
maud@pedagogfelag.fo
**FORSÍÐUMYND:** Bárður Lydersen
**BLAÐIÐ VERÐUR PRENTAÐ** í 2500 eintøkum, kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis
**ONNUR ÁHUGAÐI** kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.
**LOYVT ER** at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.
**FORÍÐUMYND** frá barnafestivalinum

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705


# Oddagrein



## Samráðingar – eitt tvíeggjað svørð

Samráðingar snúgva seg um annað enn løn. Tær snúgva seg eisini um vunnin rættindi og at tryggja, at starvsfólk eru væl vard í sínum arbeiði. Fakfeløg vilja verja borg og ansa eftir, at eingin, hóast truplar tíðir og fíggjarligar kreppur, verður viðfarin verri, enn sáttmálar og lógir tryggja teimum. Hvussu tungt og trupult tað enn er at fáa tingini at hanga saman, so eiga øll at verða viðfarin við virðing, tað er okkara aðalmál. Tíverri síggja vit alt ov ofta, at starvsfólk verða illa viðfarin, og at teirra rættindi verða skerd. Tað er sum ein fakfelagslig odontologi er farin at herja. At tenninar spakuliga skulu trekkjast úr fakfelagsrørsluni, og at arbeiðsgevarin tekur á seg alsamt meira vald. Hetta er ein skeiv gongd, tí vit vita, at innan vanliga odontologi, so verður alt gjørt fyri at varðveita tenninar og styrkja tær, hvussu veikar tær enn eru.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum sigur við Kringvarp Føroya, at talan er um frælsar samráðingar millum fakfeløg og arbeiðsgevarar. Hóast tað hevur sami mynduleiki bundið samráðingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum fastar og spælt út við, at einki er sett av til lønarhækkan. Sum so er einki nýtt í hesum. Tað er ikki mín fatan, at fakfeløgini eiga at ábyrgdast fyri førda politikkin. Føroyar er eitt av heimsins kostnaðarmiklastu londum at liva í, og tað letur seg snøgt sagt ikki altíð gera at gjalda hvørjum sitt við tí kostnaðarstøði, vit síggja í dag. Lønarkrónurnar eru okkara keypiorka, og Føroya Pedagogfelag borgar ikki júst fyri teimum høgu inntøkunum í okkara samfelag, hóast limir okkara røkja týdningarmesta starv í heiminum. Tað kann vera torført at fáa og røkja eitt fulltíðarstarv, og tí hava fleiri av okkara limum ringt við at fáa endarnar at røkka saman. Vit uppliva, at námsfrøðingar og hjálparfólk átaka sær vaskiarbeiði og annað arbeiði afturat sínum fasta arbeiði fyri at hava ráð at rinda hvørjum sítt.

Eftirlønarreformurin, sum feløgini kundu gera viðmerkingar til í summarfrítíðini, broytir ikki samfelagsliga mismuninum. Øll verða sambært uppskotinum við lóg tvungin at leggja 15% til síðis til eftirløn, bæði tann, sum í dag vinnur sær nógvar pengar, og tann, ið vinnur sær lítið. Øll hava ikki sama møguleika fyri at vinna sær pening, hvussu fegin tey enn vilja tað. Samhaldsfasta hugtakið verður individualiserað, og tann, sum hevur nógv, hann fær meira, meðan tann, sum hevur lítið, fer at hava torført at klára seg á ellisárum.

### Gerðarættarmálið

Tulkingarósemjan millum felagið og KAF var til viðgerðar í Fasta Gerðarættinum tann 3.juni í ár. Fasti Gerðarætturin gav ikki felagnum viðhald í okkara tulking av orðingini í semjuni frá des.2007 sum var hendan: *Vegleiðing um yvirflyting frá gamlari til nýggja skalagongd*

*Starvsfólk verða flutt yvir í nýggju skalagongdina, sum um skalagongdin altíð hevur verið galdandi.*

Tað, sum felagið ynskti við hesi orðing, var, at allir pedagogar vórðu innplaseraðir smb. lønarstigini 11 – 19 sambært teirra starvsaldri. Felagið var av tí fatan undir samráðingunum, at orðingin var eins skilt av báðum pørtum. Fyri felagið kundi orðingin ikki verið greiðari. Gerðarættarúrskurðurin hevur við sær, at limirnir enn arbeiða fyri ymiskar lønir hóast sama starvsaldur. Hetta fer felagið til hesar samráðingar at royna at rætta uppá, og felagið fer eisini at royna at fáa eina greiða orðing í sáttmálan um, hvussu farast skal fram, tá umflokkað verður, soleiðis at sleppast kann undan hesum ójavnum í lønunum framyvir.

### Tað skulu fleiri til at samstarva

Tíðliga í ár bjóðaði Mentamálaráðið Føroya Pedagogfelag at luttaka í einum samstarvi um at endurskoða Dagstovnalógina. Samstarv er bæði gott og krevjandi, og Pedagogfelagið var saman við Mentamálaráðnum og Kommunu Samskipan Føroya til reiðar at fara undir hetta arbeiði. Eisini vóru vit fegin um, saman við somu fólkum, at fara í holt við eitt skipað arbeiði í einum samstarvsráð, har vit skuldu tosa um, hvat rørir seg á økinum. Vit boð um, at arbeiðsgevarin ikki sá nakra meining í hesum samstarvi við Føroya Pedagogfelag. Niðurlagið var: „Tann, sum skal gjalda, valdar“, so burtur við okkara góðu hugskotum og innliti í dagstovnaøkið. Burtur við fakligu kompetensuni; og eftir stendur spurningurin um pengar og vald. Mín undran gongur til landsstýriskvinnuna við mentamálum – er hetta veruliga hennara ynski?

### Vit mundu mist 10 lesandi í svinginum

Tað var ein skelkur at fáa, tá tað kom fram, at Studni ikki hevði játtan til ætlaðu lesandi á Fróðskaparsetri Føroya. Eftir ætlan skuldu 30 næmingar byrja á námsfrøðiligu útbúgvingini og 30 næmingar á læraraútbúgvingini. Tíðindini um, at bert 20 sluppu inn á hvørja útbúgving, skaptu øsing og ørkymlan. Og eg skilti als ikki úttalilsi frá rektaranum á Føroya Læraraskúla, um at pláss var fyri fleiri læraralesandi. Taka námsfrøðilesandi meira pláss enn læraralesandi? Hóast alt so eydnaðist tað øllum 60 lesandi at byrja sína útbúgving sum ætlað. Hetta er ein minking í tali av næmingum á námsfrøðiligu útbúgvingini, umfram at tað tekur 4 ár at útbúgva teir fyrstu námsfrøðingarnar, so vit mugu vera tolin, meðan vit gleða okkum og ynskja tykkum øllum góðan lesnað.




# NEVND



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Jógvan Philbrow**
Næstformaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Sigga Joensen**
Skrivari
sigga@pedagogfelag.fo



**Jórun Ennistíg**
Kassameistari



**Jan M. Laursen**
Nevndarlimur
jan@pedagogfelag.fo

# UMSITING



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Katrin H. Thomsen**
Fyrisitingarleiðari
katrin@pedagogfelag.fo



**Anna Dalsgarð**
Bókhaldari
anna@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Skrivstovufólk
bara@pedagogfelag.fo






Myndir Alan Brockie

## Samráðingar



Sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum fara úr gildi 1. oktober. Síðani tey fimm stóru fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum handaðu síni krøv 23. juni, hava tey havt nakrar fundir við arbeiðsgevararnar, sum eru Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Tá fingu fakfeløgini eisini mótkrøvini frá arbeiðsgevarunum. Tey fimm fakfeløgini, sum samráðast saman, eru Starvsmannafelagið, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Samráðingarnar eru í tveimum pørtum. Saman samráðast tey fimm við arbeiðsgevararnar um yvirskipaðar spurningar, og hvørt sær samráðast tey um serkrøv frá hvørjum felag sær. Pedagogfelagið handaði arbeiðsgevarunum síni serkrøv 17. august, og tá fekk felagið eisini mótkrøvini.

Maud Wang Hansen, forkvinna í Pedagogfelagnum sigur, at undan samráðingunum hava limir felagsins verið hoyrdir um, hvørji krøv teir kundu hugsað sær at sett, og saman við teimum hevur nevndin sett fram síni krøv til ein nýggjan sáttmála.

Tá blaðið fór til prentingar, fáar dagar áðrenn sáttmálin fór úr gildi, læt forkvinnan í Pedagogfelagnum væl at samráðingarandanum, sum hon tók til, og vónaði, at tað fór at eydnast pørtunum at koma til eina semju.

## Nýggj nummur

Felagið hevur fingið nýggj fax- og telefonnummur.

Nýggju nummurini eru at síggja her høgrumegin:

**Føroya pedagogfelag**
Tungugøta 1
Postboks 318
110 Tórshavn
Tlf. 35 75 76
Fax 35 75 73
pedagog@pedagogfelag.fo



# Skeið fyri álitisfólk og leiðarar/varaleiðarar



*Nógv nýggj álitisfólk eru vald í ár, og nógvir nýggir leiðarar eru eisini settir á stovnunum. Felagið skipar tí fyri hesum skeiðum í sáttmálaviðurskiftum, arbeiðsmarknaðarlógum, álitisfólkaavtaluni o.ø. í november og desember mánaði.*

Í ár verða tvey skeið fyri Dagstovnaøkið og eitt skeið fyri Serstovnaøkið. – Ætlanin er at hava fleiri skeið í januar/februar komandi ár.

**Skeiðsstað:**
Starvsmannafelagið,
J.H.Schrøtersgøta 9, Tórshavn

**Skeiðsdagar:**
3 dagar – kl.9.00-16.00

**Undirvísarar:**
Katrin Hammershaimb
og Páll Nielsen, sakf.

**Kostnaður:**
Kr. 4.500.-
fyri bæði álitisfólk og leiðara

**Gjald:**
Skal flytast áðrenn byrjan
á kontu 9181 – 120.094.3

**Tilmeldingarfreist:**
20.okt. 2010

Vinaliga sendið okkum niðanfyristandandi lepa aftur skjótast tilber og í seinasta lagi tann 20.okt. 2010.

**Tað ber eisini til at melda seg til skeiðini á heimasíðu felagsins www.pedagogfelag.fo**

**Tilmeldingarseðil**
Skeið um sáttmálar, arbeiðsmarknaðarlógir, álitisfólkaavtaluna o.a.

Álitisfólk ______________________ føð.dg. ____________ fartlf. ____________

Leiðari/varaleiðari ______________________ føð.dg. ____________ fartlf. ____________

Stovnur ______________________

Setið kross við tykkara ynski:

- ☐ 1. hold fyri Dagstovnaøkið — 2.nov., 9.nov. og 10.nov.
- ☐ 2. hold fyri Dagstovnaøkið — 16.nov., 23.nov. og 24.nov.
- ☐ 3. hold fyri Serstaovnaøkið — 2.des., 7.des. og 8.des.



# DÓMUR FALLIN UM LØN

## TIL PÁPAR Í BARSILSTÍÐINI

Við dóminum er ásett, at eftir 14. viku eftir føðing er ikki longur loyvt at geva mammum betri sømdir enn pápum.

*Dómsúrskurðurin staðfestir, at sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum viðv. barnsburði eru í stríð við Javnstøðulógina.*

Felagsins sáttmáli ásetur, at kvinnan í 24 vikur av barnsburðartíðini hevur rætt til fulla løn og eftirløn frá arbeiðsgevaranum. Restin av barnsburðartíðini verður útgoldið smb. ásetingunum í Barsilslógini.

Dómurin ásetur, at pápin – um hann er fevndur av okkara sáttmála – eisini skal hava rætt til fulla løn og eftirløn – hetta kann tó bert verða galdandi frá 14.viku aftaná barnið er føtt, – tvs. í mesta lagi í 10 vikur, tá tað er staðfest í Barsilslógini, at aftaná 14.viku eftir føðing kunnu foreldrini býta eftirverandi vikur sína millum.







ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo

# ÁLITISFÓLKAFUNDUR




















# LEIÐARAFUNDUR

1. juni í ár skipaði nevndin í Føroya Pedagogfelag fyri álitisfólkafundi fyrrapart og fundi fyri leiðarar seinnapartin. Uppmøtingin var sera góð til báðar fundirnar, sum vóru í hølunum hjá Starvsmannafelagnum. Um kvøldið skipaði nevndin fyri hugnaløtu fyri nýútbúnar námsfrøðingar á Hotel Hafnia. Myndirnar eru frá øllum trimum tiltøkunum.

















# KUNNING til nýggju pedagogarnar











# Felagsins Aktións- og upplýsingargrunnur



Aktións- og upplýsingargrunnurin hevur m.a. til endamáls at granska, styrkja og breiða út kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.

Í nevndini fyri grunnin eru 3 limir, teir eru Jan Mølvad Laursen, nevndarlimur, Rikke Bak Sørensen, álitisfólk og Fríða Lómstein, álitisfólk.

Nevndin viðger innkomnar umsóknir tvær ferðir um árið, og freistin at lata umsóknirnar inn er ávikavist 31. mai og 30. novembur á hvørjum ári. Umsøkjararnir fáa svar í juni og desember.

Í umsóknini er tað neyðugt at gera eina kostnaðarmeting av tiltakinum/verkætlanini og lýsa tiltakið/verkætlanina, sum søkt verður um stuðul til. Nevndin kann loyva sær at seta treytir við, um stuðul verður játtaður.

Nevndin ynskir at stuðla so nógvum sum møguligt.




# EFTIRLØNARREFORMURIN

Ætlanin er, at nógv umtalaði eftirlønarreformurin skal leggjast fyri Løgtingið í heyst. Eftirlønarreformurin skuldi koma at virka 1.jan.2011. – Hetta er í skrivandi løtu broytt til 1.jan.2012.

Føroya Pedagogfelag hevur verið á nógvum fundum við Fíggjarmálaráðið, tryggingarfeløg o.o. um reformin. Eisini eru nógvar bæði munnligar og skrivligar viðmerkingar settir og sendir politisku myndugleikunum.

Fakfelagssamstarvið hevur sent Fíggjarmálráðnum og politiska fylgibólkinum endaligu viðmerkingar - Sí skriv aðrastaðni her í blaðnum.

Eftirlønarreformurin leggur upp til grundleggjandi broytingar á eftirlønarøkinum. – Men uppskotið er ikki enn lagt fyri Løgtingið, so sjálvsagt kann uppskotið broytast nógv, áðrenn tað verður endaliga samtykt.

Tær mest markantu broytingarnar, sum uppskotið leggur upp til eru:

at tann uppsparda eftirlønin ikki verður útgoldið í einum við eftirlønaraldur, sum higartil, men at tað tá bert kunnu útgjaldast í mesta lagi 10% av uppsparda virðinum í einum, meðan hini 90% antin skulu útgjaldast sum lívrenta - t.e. í mánaðarligum gjøldum restina av livitíðini - ella sum Lívrenta og Lutaeftirløn, ið merkir, at ein partur max 55 % verður útgoldin í ratum yvir minimum10 ár, meðan restin skal útgjaldast sum Lívrenta.

Í dag hava okkara limir kapitaleftirlønarskipanir, ið merkir, at við eftirlønaraldur fær ein alla uppspardu upphæddina útgoldna í einum, har 35% verður tikið av í skatti.

Hetta verður framhaldandi galdandi fyri tað uppsparda virði, sum limirnir hava spart sær upp, áðrenn eftirlønarreformin kemur í gildi 1.1.2012.

Ein onnur stór broyting er, at limirnir aftaná reformin skulu verða fyltir 67 ár, áðrenn persónliga eftirlønin kann útgjaldast.

Í dag ber til at fáa eftirlønina útgoldna við 60/65 ára aldur. – Her er eisini tað galdandi, at tað, ið uppspart er, áðrenn reformurin verður samtyktur, kann útgjaldast eftir gomlu ásetingunum.

Politiskt eru longu 1.jan.2010 stig tikin til, at í mesta lagi Kr.25.000 árliga kunnu setast inn á kapiltaleftirlønarskipanir, ið merkir, at fyri teir limir, har árligu eftirlønarinngjøldini eru hægri enn kr. 25.000 árliga, verður restin flutt á lutaeftirlønarskipanir.

# SVARSKRIV

## til politiska fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið í samband við lógaruppskotini, ið liggja til grund fyri pensjónsnýskipanini

*Eftir at hava luttikið í viðgerðini og kjakinum um pensjónsnýskipanina, sendir Fakfelagssamstarvið nú endaligt svarskriv til politiska fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið. Svarskrivið fevnir um viðmerkingar umframt spurningar, sum Fakfelagssamstarvið ynskir at fáa útgreinaðar frá politiska fylgibólkinum og viðkomandi ráðum, eftir at uppskot um lógargrundarlag undir pensjónsnýskipanini nú er tøkt. Saman við hesum svarskrivi, verður framhaldandi víst á viðurskifti, ið vit hava tikið fram í øðrum svarskrivum.*

*Nevnast skal, at fleiri viðurskifti í lógargrundarlagnum eru jalig og viðkomandi. Vit hava tó valt ikki at seta sjóneykuna á hesi viðurskifti, men á tey viðurskifti, sum vit meta verða óheppin og ógreið.*

### Skynsamir uppspararar straffaðir

Fakfelagssamstarvið ger enn einaferð vart við, at omanfyri nevndu fakfeløg, og onnur, ið hava verið skynsom og spart upp til munadygga eftirløn, verða straffað við pensjónsnýskipanini. Somu skynsomu feløg skulu nú rinda meira til tey, ið hava ligið sjóvarfallið av sær, og ikki spart upp til egna eftirløn. Fakfeløgini hava farnu árini samstundis fráskrivað sær rættin til lønarhækkingar fyri ístaðin at økja um eftirlønina. Hetta hevur ført við sær lægri realløn fyri limir hjá feløgunum í Fakfelagssamstarvinum. Tí fer Fakfelagssamstarvið at hava vakið eyga við samráðingunum komandi tíðina fyri at tryggja, at tey, ið ikki hava nøktandi eftirlønaruppsparing, ikki fáa ókeypis ágóðar, nú tað er eitt krav, at øll skulu spara upp sambært §2 í uppskoti til løgingslóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn. Okkara fatan er, at summar ásetingar í lógaruppskotunum gera seg inn á sáttmálaviðurskifti hjá feløgunum.

### Høvuðsendamálið neyvan nátt

Sambært viðmerkingum til lógaruppskotini er høvuðsendamálið (við broytingini) at „...styrkja hugin at hava inntøku í pensjónsárunum, við arbeiði og egnari uppspardari eftirløn“. Tað er okkara greiða fatan, og egnar útrokningar vísa eisini, at so er ikki. Við ætlaðu broytingunum og mótrokningunum, loysir tað seg ikki at hava nevniverda eginintøku, umframt fólkpensjónina. Vit heita tí á politiska fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið at vísa okkum á tøl sum staðfesta, at høvuðsendamálið við pensjónsnýskipanini verður rokkið næstu árini.

Onnur viðkomandi sannroynd er, at mótrokningin í fólkapensjónini, broytta skattingin av kapitalpensjónini og tað, at bert 10% kunnu setast av til kapitalpensjón, vil helst hava ta avleiðing, at uppsparingarhugurin og atferðin broytist hjá fakfeløgum og limum tess. Tað vil gerast nógv meira attraktivt at fáa eftirlønarpartin útgoldnan sum løn og sjálv/-ur seta hann inn á bundna kontu í banka. Skatturin av útgoldnari kapitalpensjón verður 45% og hetta er umleið tað sama sum vanlig inntøkuskatting. Tí er lítil fyrimunur við at seta á eftirlønarkontu í tryggingarfelagi í mun til at seta inn sjálv/-ur á bankabók. Fakfeløg og stakpersónar fara tí helst at royna at halda seg til minsta inngjald sambært lógini (3% í 2011) og fólk fara at gjalda størri part á privatar uppsparingarkontur í banka. Trýstið á útgjaldið til fólkapensjón vil tí økjast og tí kann vera ivasamt um skipanin fer at hanga saman fíggjarliga um 10-15 ár.

### Sipið ístaðin til lønarhækkingar sum heild

Í §2 stk 2 í uppskoti til løgtingslóg um javning av fólkapensjón stendur, at: „tímalønin, sum verður nýtt til áseting av lønarhækkingini, er grundtímalønin pr 1. oktober hjá Føroya Arbeiðarafelag...“. Fakfelagssamstarvið metir tað vera óheppið at sipa verður til lønarsáttmála hjá einstøkum felag. Hetta er heldur ikki vanlig siðvenja, og vit heita tí á fylgibólkin og Fíggjarmálaráðið um at broyta hetta, soleiðis at grundarlagið er tann, til einhvørja tíð, galdandi lønarkarmur.

### Hjúnaskilnaður hoyrir ikki heima í lógargrundarlagnum

Í uppskoti til lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn, verður m.a. hjúnaskilnaður nevndur og at eftirløn í samband við hjúnaskilnað <u>kann</u> verða partur av felags búgvi. Talan er um luta- og kapitalpartin ella partin sum er inngoldin til ótilskilaðan útgjaldshátt (tí hesin verður mettur sum lutapartur). Fakfelagssamstarvið metir, at eitt býti av eftirløn, í samband við hjúnaskilnað kann føra við sær, at meginreglan, um at øll sum fráliður hava eina nøktandi eftirløn, kann verða brotin. Tí mæla vit staðiliga til, at hesin parturin av lógini verður hildin uttanfyri pensjónslóggávuna. Eitt sera viðkomandi dømi er um kvinna, ið hevur arbeitt niðursetta tíð og tískil hevur lága eftirløn, verður skild frá manni, sum hevur alla eftirlønina tilskilaða sum lívrentu. Tá fær maðurin helvtina av eftirlønini hjá konuni. Maðurin fær tá enn betur eftirløn og konan stendur at kalla eftir við ongum og fíggjarliga livigrundarlagið á ellisárum er tá fullkomiliga avskeplað. Hópin av øðrum øðrvísi dømum um hetta eru eisini.

### Fleiri eru í vanda fyri at detta niður ímillum fíggjarliga av hægri pensjónsaldri

Ein veruleiki, sum umboð fyri politiska fylgibólkin í farna samskiftinum ikki hava viljað sæð í eyguni er, at fleiri fakbólkar eru serliga útsettir fyri at verða kropsliga og sálarliga útbrendir væl áðrenn 60-ára aldur. Skerjingar í starvsfólkahópum, skilaleysar rationaliseringar og effektiviseringar hava eisini tær avleiðingar, at fólk eru og verða niðurslitin væl undan pensjónsaldri. Samstundis eru flestu av hesum persónum, ið eru kropsliga og sálarliga útbrendir, ikki búskaparliga óheftir av tí at húsalán og annað framvegis skal gjaldast; oftani fram til 67-ára aldur. Stórur vandi er herumframt fyri, at hesi ikki fáa útgoldna óarbeiðsføristrygging. Við uppskotnu meginreglu um, at eftirløn í fyrsta lagi skal útgjaldast við 67 ár og vantandi upplýsing og ætlanum um fyritíðarpensjónsøkið, er hópur av persónum, sum í komandi tíðum kunnu koma í sera óhepna støðu og als ikki megna at svara hvørjum sítt. Hetta má støða takast til frá politiskari síðu.

### Útrokningar, í sambandi við fyritíðarpensjónir og hækkandi eftirlønaraldur, vanta

Hóast politiska kjakið um hægri eftirlønaraldur fyribils er lagt á ís, er í svarum frá Fíggjarmálaráðnum grundgivið fyri týdninginum fyri pensjónsnýskipanina, at hesin aldur verður hækkaður. Í tráð við hetta fer Fakfelagssamstarvið *enn* einaferð at eftirlýsa útrokningar sum vísa væntaða økta kostnaðin á fyritíðarpensjónsøkinum. Hesi tøl eiga so at verða sammett við ætlaðu sparingarnar á fólkapensjónsøkinum.

Við vón um framhaldandi gott samskifti.

**Føroya Pedagogfelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarrøktarfrøðingar**
**Føroya Lærarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag og Starvsmannafelagið**

Eftirlønir:

# TAÐ ER **LÍV** Í **LÍV**

## Tað hendir ein rúgva á tryggingarfelagnum Lív í hesum døgum.

Pedagogar hava sína eftirløn í tryggingarfelagnum Lív, umframt at felagið hevur eina felags samlagstrygging fyri limirnar. Limirnir fáa nú fleiri møguleikar viðvíkjandi síni eftirløn. Boðskapurin hjá Lív er:

*Tað er so ymiskt, sum lívið lagar seg fyri okkum øll. Tiskil hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønarskipanum. Vit eru Føroya størsta og royndasta eftirlønsfelag, og bjóða tær at tillaga tína eftirløn, so hon hóskar seg til tað lívið, tú vilt liva, og til ta framtíð, tú hevur útlit til.*

Tað sum liggur aftanfyri hesi orðini er, at Lív hevur eina nýggja skipan, har limurin sjálvur kann ávirka hvussu eftirlønin verður rentað. Hendan skipanin verður nevnd *Marknaðar eftirløn*, og leggur upp til, at eftirlønin verður sett í virðisbrøv; í høvuðsheitum lánsbrøv og partabrøv. Tað serliga er, at limurin sjálvur hevur ávirkan á hvussu samansetingin skal verða, og limurin kann sjálvur stýra samansetingini av eftirlønini á kundaportalinum hjá Lív. Eyðkenni er, at eftirlønin fylgir sveiggjunum í marknaðinum og úrslitið er at skipanin gevur møguleika fyri at fáa eitt størri avkast.

### Verandi skipan

Tann eftirlønin, ið limirnir higartil eru vanir við frá Lív, er tann verandi *Trygg eftirløn.* Við henni nýtist liminum ikki at stúra fyri um samansparingin brádliga lækkar í virði. Í staðin fyri sveiggjandi avkasti, verður ásett ein javnari renta fyri samansparingina. Trygg eftirløn gevur liminum garanteraðar minstuveitingar, umframt møguleika fyri bonus.

### Hvat skal limurin velja

Tað er sjálvandi altíð gott við valmøguleikum. Men hvat skal ein limur velja av hesum báðum skipanum. Skal ein velja valfrælsi og møguleikar fyri hægri avkasti, fram um gomlu skipanina við størri tryggleika. Hendan trupulleikan hevur nýggja skipanin hjá Lív eisini tikið hædd fyri – tí tað er møguleiki fyri at fáa bæði. Hetta verður nevnt *Samansett eftirløn.* Umframt trygdina frá verandi skipan, kann limur eisini fáa valfrælsi og áviarkan, umframt møguleika fyri hægri avkasti. Hetta verður gjørt við at býta inngjaldið sundur, so ein partur fer til verandi skipan, og ein partur til nýggju marknaðar eftirlønina.

Neyvari kunning verður send limunum í næstum, um hvussu og hvat limurin skal gera fyri at fáa nýggju møguleikarnar settar í verk fyri sína eftirløn.

**Trygg eftirløn**

*Eftirlønin mennist javnt og støðugt, og tú fært trygd fyri ávísari veiting*

**Marknaðar-eftirløn**

*Íløgan fylgir marknaðinum, og gevur møguleika fyri ávirkan og størri avkasti*

**Samansett eftirløn**

*Tað besta úr báðum: tú fært tryggleika, umframt møgu-leika fyri størri avkasti*





**Stig 1: Vit taka okkum av tínum pensjónspappírum**
- so kanst tú lesa tey, tá ið tú vilt

Pensjón er nakað, ið skal vera í trygg-um hondum, uttan at tær nýtist at gera nakað hóvasták. Vit hava sett okkum fyri at geva kundum okkara betri innlit í, hvørji útlit teirra eru. Tí eru vit farin undir eina tilgongd, ið stigvíst ger tað lættari hjá tær at fáa yvirlit yvir tína pensjón.

Í fyrsta stigi hava vit lagt tíni pensjóns-pappír út á okkara kundaportal. Harvið sleppur tú undan at hava skjølini í tjúkk-um ringbindum. Ístaðin fert tú inn á liv.fo og fært lættari, skjótari og betri innlit í, hvussu tín pensjón er skipað. Alt er lagt fram – lætt og greitt.

Stig 1 Kundaportalur | Stig 2 Seniorskipan | Stig 3 Marknaðarrenta | Stig 4 Frítt íløguval | Stig 5 Pensjónsnýskipan

LÍV Innlit í útlit

# Tá talan er um at lýsa størv alment, eru fleiri viðurskifti, sum gera seg galdandi

Ásetingar, sum eru í Dagstovnalógini og sáttmálunum við Fíggjarmálaráðið, eiga sjálvsagt at verða fylgdar. Felagið fær onkuntíð fyrispurningar um, hvørt tað er neyðugt at lýsa í bløðunum. Onkur metir, at tað er so kostnaðarmikið, at tað tyngir raksturin á stovninum, tá lýsast skal sambært ásetingunum.

Tíðirnar eru broyttar frá, tá bløðini og svartatalva vóru einastu miðlar av almennum slag, og tað er mín fatan, at Pedagogfelagið eisini skal fylgja tíðarrákinum. Tó er umráðandi, at ásetingar í lóg og sáttmála verða fylgdar.

Summastaðni síggja vit, at ein stutt lýsing í bløðunum vísir beinleiðis til eina heimasíðu, har sjálvt innihaldið í lýsingini stendur. Umráðandi fyri felagið er, at allar lýsingar røkka út til so breiðan skara av møguligum umsøkjarum sum yvirhøvur gjørligt. Ein møgulig heimasíða, sum víst verður til, skal hava so stórt alment virði, at eingin ivi er um, at innihaldið í lýsingunum er atkomiligt fyri ein og hvønn, sum ynskir at søkja starv hjá viðkomandi arbeiðsgevara. Limir hjá Pedagogfelagnum hava møguleika fyri at lýsa á heimasíðu felagsins, men hetta er ikki at meta við at lýsa alment, og tí eigur tað fyrst og fremst at verða lýst í bløðunum.

*Maud Wang Hansen, forkvinna*



## Ókeypis starvslýsingar

Nevndin í Føroya Pedagogfelag bjóðar arbeiðsgevarum, sum søkja eftir pedagogum, hjálparfólkum og øðrum starvsfólkum, sum hoyra til sáttmálaøkið hjá Pedagogfelagnum, at lýsa ókeypis á heimasíðu felagsins.

Tað er ein treyt, at starvslýsingin er í samsvari við sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya 2007: grein 14 í sáttmálanum fyri pedagogar og grein 20 í sáttmálanum fyri hjálparfólk.

Pedagogfelagið skal minna leiðararnar ella tey, sum fáast við starvslýsingar, á, at fylgjandi verður uppfylt:

- Tá ið starv er leyst, skal tað lýsast í minst einum føroyskum blað.
- Tilskilast skal, hvat starvið fevnir um, setanarbrot, arbeiðstíð og hvørjum lønarflokki starvið verður lønt eftir. Sama er galdandi, tá ið lýst verður eftir fyribils hjálp.
- Umsóknarfreistin eigur ikki at vera minni enn 14 dagar.
- Er talan um nýtt starv, sum higartil ikki er flokkað, skulu sáttmálapartarnir samráðast um flokkan, áðrenn starvið verður lýst leyst.

Arbeiðsgevarin kann senda starvslýsingina við telduposti til pedagog@pedagogfelag.fo. Arbeiðsgevarin fær boð frá Føroya Pedagogfelag, tá ið lýsingin sæst á heimasíðuni.

*www.pedagogfelag.fo*



*Orð og mynd: Tórfinn Smith*

# Starvsfólkalýsing á heimasíðu - við ávísing í dagbløðunum

Øll almenn størv skulu lýsast alment. Hetta fyri at lýsingin røkkur so langt sum gjørligt, og at øll, sum hava áhuga, fáa møguleika at síggja lýsingina og søkja viðkomandi starv.

### Men hvat er so tað at lýsa alment?

Fyri nøkrum árum síðani var spurningurin sera lættur at svara. Vit høvdu dagbløðini, sum komu út í hvønn krók í landinum, og tí var hetta ein heilt natúrlig mannagongd, tá lýsast skuldi eftir fólki.

Við nýggju samskiftistøknini er nógv broytt, soleiðis at ein alt størri partur av samskifti og kunning fer fram á alnótini. Tí hevur eisini spurningurin tikið seg upp, um nóg mikið er hjá einum almennum stovni at lýsa á alnótini – helst á síni egnu heimasíðu.

Páll Nielsen, advokatur, sigur, at í so máta eru ongar heilt greiðar reglur, – vit eru sindur í eini grásonu, sum hann tekur til, men vísir til danska umboðsmannin, sum hevur tikið spurningin upp.

Danski umboðsmaðurin hevur verið sera trekur at víkja frá tí siðbundna, men hevur nú lyndi til at lata upp fyri møguleikanum, at lýst verður á alnótini, men hann hevur eisini víst á, at ráðiligast er í hvussu er, at lýsingin eisini verður ávíst í dagspressuni.

Danski umboðsmaðurin hevur eisini víst á, at atlit mugu takast til, at tað ikki eru øll, sum hava sítt dagliga yrki við telduna, og tí er boðskapur á alnótini ikki líka natúrligur hjá øllum.

Páll Nielsen sigur seg ikki ivast í, at hetta rákið kemur eisini til okkara, men fyribils má í hvørjum einstøkum føri verða mett um, hvat rættasta mannagongdin er, tá tað almenna lýsir eftir fólki. Tað avgerandi er, at øll, sum kunnu hugsast at hava førleika og áhuga at røkja slíkt starv, verða kunnað um starvslýsingina.

Spurdur um, hvussu er við sonevndu almennu partafeløgunum, sigur Páll Nielsen, at hóast landskassin eigur partapeningin í einum felag, so ger hetta ikki í sjálvum sær, at hetta felag kemur undir reglurnar um almenna fyrisiting og harvið kravið um, at størv skulu lýsast alment. Kravið um, at størv skulu lýsast leys, kann tó vera ásett í sáttmála við avvarandi fakfelag, sigur Páll Nielsen.

*Páll Nielsen, advokatur*



## Hvat er tað at lýsa alment?

AT LÝSA ALMENT

*Orð og mynd: Tórfinn Smith*

# Lýsast skal ALMENT!

Spurningurin er bara, hvat tað merkir. Er tað nóg mikið at lýsa á egnari heimasíðu ella sum ein ávísing í bløðunum til heimasíðuna, tá lýst verður eftir fólki til almenn størv. Starvsblaðið spurdi fyri stívliga einum ári síðani leiðaran á Lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum



Snorri Fjalsbak, leiðari á Lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum segði, at ongar greiðar reglur eru, uttan so, at høvuðsboðskapurin er, at allir potensieller umsøkjarar hava møguleika at frætta um starvið so ella so. Hvat tað so er, er ilt at siga, tí tíðir broytast skjótt, og rættiliga ymiskt er, hvat stendur í teimum ymiskum sáttmálunum um hetta. Harafturat kemur, at í sambandi við at lýsa á internetinum vita vit, at tað eru tey, sum dagliga arbeiða við teldu, meðan onnur als onga teldu hava, og tí er eisini torført at hava nakrar yvirskipaðar reglur. Í onkrum føri kann sigast, at tað er nóg mikið at lýsa á egnari heimasíðu, og í øðrum førum ikki, segði Snorri Fjalsbak.

## Lønardeildin kann bert leiðbeina

Spurdur um, hvør ger av, hvat er nóg góður máti at lýsa, segði Snorri Fjalsbak, at tað er arbeiðsgevarin. Leiðarin á Lønardeildini greiddi annars frá, at tað kemur fyri, at Lønardeildin fær fyrispurningar frá arbeiðsgevara um, hvussu lýsast skal. Onkur spurningur hevur verið, um nóg mikið er at hava eina lítla ávísing í føroyskum blaði, sum vísir til heimasíðuna hjá stovninum, og tað góðtekur Lønardeildin.

*Snorri Fjalsbak, leiðari á Lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum*


Føroyska stavraðið á teppi!




Stavrað "øðrvísi læruháttur" við ljóðrøttum myndlýsingum.
Sjálvljóðini eru reyð, hjáljóðini eru blá og tvíljóðini eru appelsingul.
Teppini eru 3mm tjúkk við gummirangu.

Bílegging á: toka@kallnet.fo
Katrin Patursson • tel 59 19 70




# BÓKSTAVALÆRA VIÐ RØRSLU

*Katrin Patursson kann eisini bjóða áhugaðum eitt teppi við tølum, soleiðis at tað eisini ber til at læra at rokna við rørslum.*

*Orð og mynd: Tórfinn Smith*

Eitt teppi við føroyska stavraðnum við eini tekning í sambandi við hvønn einstakan bókstavi skal hjálpa børnum at læra bókstavirnar, og somuleiðis hvussu teir ljóða. Munurin á hesum og talvuni á vegginum við bókstavum og at kalla somu myndum er, at á teppinum fáa børnini møguleika til at nema sær bókstavakunnleika, ikki bert gjøgnum oyru og eygu, men eisini við rørslu. Børnini kunnu hoppa frá einum bókstavi á annan ella nema teir við hondunum – ein øðrvísi læruháttur. Sjálvljóð, hjáljóð og tvíljóð hava hvør sín lit, júst sum onkrar av nýggjaru frálærubókunum fyri tey yngstu, eitt nú Súlubøkurnar og Hervør og Høgni.

Tað er Katrin Patursson, námsfrøðislesandi, sum hevur tilevnað føroyska teppið. Katrin greiðir frá, at hugskotið við bókstavateppinum er ikki nýtt. Tað finst á donskum, men hon helt tað vera bæði synd og skomm, at tað ikki eisini kundi fáast við føroyska stavraðnum. Hon var í starvslærutíð sína á Skúlanum á Trøðni, og har gjørdist hon sannførd um, hvussu stóran týdning tað hevur fyri børnini, at tey eisini fingu møguleika at læra gjøgnum rørslu, og tí setti hon sær fyri at tilevna læruháttin á føroyskum máli. Tað hildu lærarar og námsfrøðingar á skúlanum vera gott hugskot; og hon fekk eisini fekk dyggan stuðul og vegleiðing frá teimum.

Katrin heldur, at øll børn í ávísum aldursbólki kunnu fáa gagn av teppinum, ikki minst elstu barnagarðsbørnini og tey í forskúla. Men teppið kann saktans eisini brúkast heima, og tað dámar børnunum væl. Tað veit hon frá sínum egnu børnum. Hon hevur nú latið gjørt nøkur teppi. Skúlin á Trøðni gjørdi beinanvegin av at keypa tvey, og onkur dagstovnur hevur eisini víst hesum áhuga. At framleiða hetta teppið fyri kappingarføran kostnað, í mun til tað, eitt nú eitt danskt kostar, hevur ikki víst at vera nakar trupulleiki.






# EYKAÐALFUNDUR

## verður á Hotel Føroyum 30. oktober

Kl. 11.00-12.00:

### Framløga

Karin Jóhanna Knudsen kemur at leggja fram úrslitið av einari kanning, sum Granskingardepilin fyri samfelagsmenning hevur gjørt á dagstovnaøkinum.
Hetta arbeiðið er umbiðið av Føroya Pedagogfelag, og vit eru spent at hoyra, hvørji úrslit kanningin gevur, og hvørjar ábendingar eru um trivnaðin í arbeiðinum á dagstovnaøkinum.

Kl.12.00 – 13.00:

### Innskriving til eykaaðalfund

Meðan innskrivingin fer fram, verður ein ábit.

Kl. 13.00 -16.00

### Eykaðalfundur

Skrá:
1. Lógarbroytingar
2. Ymiskt

Sambært grein 8,6.stk kunnu lógarbroytingar bert fremjast, tá ***15% av limunum eru møttir á fundi, og at viðtøkurnar verða samtyktar við 2/3 av greiddum atkvøðum.***

Á aðalfundinum 20. mars varð samtykt at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til lógarbroytingar. Hetta arbeiðið er nú liðugt, og eykaaðalfundur verður hildin fyri at fremja hesar lógarbroytingar. Fyri at fáa lógarbroytingarnar framdar, er neyðugt, at 15% av limunum møta á eykaaðalfundi. Tað merkir, at í minsta lagi 300 limir mugu møta á fundi. Tað er tí sera umráðandi, at limir vísa hesum áhuga og møta á fundin tann 30. oktober 2010. Um undirtøkan er ov lítil, verður neyðugt at avlýsa fundin.

Nevndin og arbeiðsbólkurin heitir á allar limir um at boða frá luttøku skjótast gjørligt og í seinasta lagi 14.oktober 2010, antin á heimasíðuni www.pedagogfelag.fo ella við at venda sær til felagið á tlf. 357576. Sera umráðandi er, at tey sum melda seg til fundin, eisini møta upp, so fundurin verður viðtøkuførur.

Okkurt skemtiligt innslag verður á fundinum, so vit fáa hildið heilakyknurnar vaknar ☺

# UPPSKOT TIL LÓGARBROYTINGAR

## Á EYKAAÐALFUNDINUM Í OKTOBER 2010

### § 1.Navn og heimstaður

1.stk. Navn felagsins er Føroya Pedagogfelag
2.stk. Felagið hevur heimstað í Føroyum.

### § 2. Endamál og virki felagsins

1.stk. Felagið, sum er flokspolitiskt óheft, hevur sum endamál

a) at virka fyri, at fólk við pedagogútbúgving verða sett í øll størv,hvørs uppgáva er at menna børn og ungfólk, eins og tilkomin, sumhava tørv fyri pedagogiskari menning.

b) at virka fyri, at um umnormeringar av pedagogtímum verða framdará okkara sáttmálaøki, so skulu teir nýggju pedagogtímarnir ikkisetast fyrr enn hjálparfólk náttúrliga fara úr starvi. Verandi pedagogstørv, har hjálparfólk eru sett, skulu lýsast leys hálva hvørt ár.

c) at taka sær av fakligu áhugamálum limanna, bæði á fyrisitingarliga,fíggjarliga og pedagogiska økinum.

d) at tryggja og umsita samráðingarrættin millum arbeiðsgevaran ogfelagið og gera avtalur um sáttmála partanna millum.

e) at arbeiða fyri eini tíðarhóskandi grund-, víðari- og eftirútbúgving,

f) at virka fyri størri kunnleika um og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum,

g) at veita limunum hjálp í fakligum spurningum, og tá nevndin metir tað, eisini løgfrøðiliga hjálp,

h) at fremja gransking á tí sosiala og pedagogiska økinum,

i) at styrkja eina strukturella og fyrisitingarliga uppbygging á arbeiðs-økinum, sum er best hóskandi til at fremja endamál felagsins,

j) at arbeiða saman við øðrum feløgum um felags endamál.

2. stk. Felagið virkar sum samráðingarstovnur mótvegis arbeiðsgevarafeløgumog almennum myndugleikum.

Verður ikki vunnið á mál við samráðingum, hevur felagið rætt at fremja yrkisligar atsóknir.

Avgerð um hetta verður tikin av nevndini.

3. stk. Felagið kann gera samstarvsavtalur við onnur feløg, annaðhvørt fyri einstakar limabólkar ella fyri allar limirnar. Felagið kann gera avtalur við onnur feløg um mark fyri virksemi sínum.

4.stk. Felagið kann gera avtalur um at samskipa seg ella leggja saman við aðrarfelagsskapir, sum hava nærum sama endamál, tá ið limaupptøkan verður kollektiv.

Avgerð hesum viðvíkjandi verður tikin á aðalfundi, tá ið nevndin hevur giviðtilmæli. Og krevst at 2/3 av teimum, sum eru á fundi, atkvøða fyri.

### § 3 Limaskapur

1. stk. Rætt til vanligan limaskap hava tey, sum hava námsfrøðiútbúgving el.líkn., hjálparfólk, eisini tey hjálparfólk, sum lesa á netinum og eru í farloyvi í sambandi við ólønta starvsvenjing og verkstaðsassistentar, sum starvast á pedagogiskum arbeiðsplássum. Limir, sum eru í barsilsfarloyvi eru at meta sum vanligir limir.

2. stk. Nevndin kann taka avgerð um, at einstaklingar, ið ikki eru umfataðir av 1.stk., kunnu gerast vanligir limir.

3. stk. Tann, sum gerst limur seinni enn 3 mánaðir aftaná at verða settur í starv ella aftan á lokna útbúgving, kann ikki krevja hjálp frá felagnum, fyrr enn limaskapurin hevur vart í 6 mánaðir. Sama er galdandi fyri persónar, sum fyrr hava verið limir, tá ið limaskapurin verður endurnýggjaður. Sama er eisini galdandi fyri limir, sum eru í eftirstøðu við limagjaldi í meira enn 3 mánaðir.

4. stk. Limir kunnu ikki krevja hjálp frá felagnum í máli, sum er komið upp áðrenn viðkomandi fekk limaskap í felagnum.Limir eru valbærir til álitisstørv í felagnum, tá ið teir hava verið virknir limir í felagnum í 6 mánaðir.

Limirnir ábyrgjast ikki persónliga fyri fíggjarligu ábyrgdum felagsins.

### § 4 Óvirknir limir

1. stk. Vanligir limir, sum í styttri ella longri tíð ikki hava starv, herundir limir, sum eru í farloyvi uttan løn ella sum søkja starv, kunna gerast óvirknir limir. ~~Sama kunnu limir, sum eru farnir yvir í annað starvsøki, og limir sum eru fluttir úr Føroyum.~~ Persónar, sum eru eftirløntir frá størvum, og sum vóru vanligir limir, tá ið teir fóru frá, kunnu eisini gerast óvirknir limir.~~, um teir hava verið virknir ella óvirknir limir í felagnum í 5 ár.~~

Um aðalfundurin góðkennir tað, kunnu bólkar ella einstaklingar, ið ikki kunnu verða vanligir limir, gerast óvirknir limir.

2.stk. Lesandi, ið eru undir námsfrøðiligari útbúgving, kunnu gerast óvirknir limir og gjalda hesir limir ikki limagjald.

3. stk. Óvirknir limir, eru ikki valbærir og hava ikki atkvøðurætt.

### § 5 Limaskyldur

1. stk. Limirnir hava skyldu at halda lógir felagsins og virða tær av felagnum gjørdu avtalur og sáttmálar og tær avgerðir, sum felagið hevur tikið í m.ø. fakligum spurningum.

2.stk. Tá ið samráðingar fara fram ella felagið hevur mál til viðgerðar, kunnu limir ikki sjálvir samráðast ella gera avtalu við hin partin, uttan so at felagið gevur loyvi til hetta.

3.stk. Limir kunnu ikki siga seg burtur úr felagnum í tíðarskeiðinum frá tí, at boðað er frá arbeiðsósemju, og til hon er at enda, undantikið tó, tá ið limurin hevur skift til annað arbeiði, sum er uttan fyri sáttmálaøki felagsins.

4.stk. Limirnir hava skyldu at geva felagnum fráboðan um útbúgving, arbeiðspláss og bústað.

Broytingar hesum viðvíkjandi verða eisini at upplýsa felagnum.Limur hevur skyldu til, tá ið skift verður til annað arbeiðið, ið hoyrir undir annað fakfelagsøki, at siga felagnum frá í seinasta lagi 14 dagar aftaná at viðkomandi er byrjaður á nýggja arbeiðsstaðnum.

Flytingin til nýggja yrkisfelagið, sum fingin verður ílag við viðkomandi felag, fær gildi frá fyrsta mánaðarskifti.

~~5. stk. Limirnir skulu virka fyri, at størv av áhuga verða lýst leys bæði í fakbløðunum og í teimum føroysku bløðunum.~~

5.stk. Sigur limur seg burtur úr felagnum, skal hetta verða gjørt skrivliga til nevndina og kann bert verða gjørt til komandi mánaðarskifti.

### § 6 Brot á limaskyldur

1. stk. Nevndin kann fyri styttri ella longri tíðarskeið koyra úr felagnum limir, ið bróta avtalur ella sáttmála, ið felagið hevur gjørt ella á einhvønn annan hátt mótarbeiða áhugamálum felagsins.Er talan um álvarsom brot, kann nevndin avgera, at limur verður koyrdur úr felagnum. Eisini kann nevndin taka avgerð um at áleggja slíkum limum sekt, sum í mesta lagi svarar til 1 mánaðarløn sambært byrjunarlønini fyri pedagogar í galdandi pedagogsáttmála.

2. stk. Limur hevur rætt til skrivliga ella munnliga, at føra fram síni sjónarmið fyri nevndini, áðrenn avgerð verður tikin.

3. stk. Limurin, sum fyri styttri ella longri tíð ella endaliga verður koyrdur úr felagnum, kann krevja, at spurningurin verður lagdur fyri fyrstkomandi aðalfund til endaliga avgerðar.

4. stk. Til at samtykkja at koyra lim úr felagnum samb. 1.stk. og á aðalfundinum samb. 3.stk. krevst, at í minsta lagi 2/3 av teimum, sum eru á fundi, atkvøða fyri.

5. stk. Nevndin kann, eftir skrivliga ávaring koyra lim, ið eru í eftirstøðu í meira enn 3 mánaðir, úr felagnum.

6. stk. Ein limur, sum er koyrdur úr felagnum, kann eftir umsókn gerast limur aftur, tá nevndin heldur hetta, móti gjaldi, sum nevndin ásetur. Gjaldið kann í mesta lagi svara til 1 mánaðarløn sambært byrjunarlønini fyri pedagogar í galdandi pedagogsáttmála. Noktar nevndin at geva viðkomandi limaskap aftur, kann viðkomandi krevja, at spurningurin verður lagdur fyri fyrstkomandi aðalfund til viðgerðar.

### § 7 Limagjald

1. stk. Aðalfundurin ásetir limagjaldið. Nevndin kann gera sertreytir ella sleppa einum limi undan limagjaldi.

### § 8. Aðalfundur

1. stk. Aðalfundurin hevur hægsta vald í felagnum.

Aðalfundurin ásetir høvuðsstevnumið felagsins, og tekur avgerð í teimum spurningum, sum nevndir eru í § 8, stk.5

2. stk. Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá ið hann er lógliga fráboðaður.

Bert uppskot, ið eru á fundarskránni kunnu verða viðgjørd á aðalfundinum.

3. stk. Allir limir felagsins hava atgongd til aðalfundin.

Óvirknir limir eru ikki valbærir og hava ikki atkvøðurætt. Sama er galdandi fyri limir, ið eru í eftirstøðu í meira enn 3 mánaðar roknað fram til 1.februar.

4.stk. Ársaðalfundurin verður hildin á hvørjum ári áðrenn 15. apríl.

Nevndin skal lýsa aðalfundin í føroysku bløðunum í seinasta lagi 15.januar.

Ynskir limur uppskot viðgjørt á aðalfundinum, skal uppskotið latast nevndini við skrivligari váttan frá viðkomandi uppskotsstillara, og vera nevndini í hendi í seinasta lagi 1.februar.

Sama er galdandi fyri uppskot um ásetan av limagjaldi.

Fundarskrá fyri aðalfundin skal verða send út til limirnar í seinasta lagið 7 dagar áðrenn aðalfundin.

5.stk. Ársaðalfundurin hevur hesa fundarskrá:

A. Val av fundarstjóra og skrivara
B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin
C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar
D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar
F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins
G. ~~Val av formanni annað hvørt ár~~
H. ~~H. Val av nevndl.~~ G.Val av eykalimum
H. Val av grannskoðarum
I. I. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi
J. J. Ymiskt

6.stk. Avgerðir á aðalfundinum verða samtyktar við vanligum meiriluta.

Til lógarbroytingar krevst tó, at 15% av limunum eru møttir á aðalfundi, og at viðtøkan verður samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum.Til at taka felagið av krevst, at 2/3 av limum felagsins eru møttir á aðalfundi, og at viðtøkan verður samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum.Um ikki meirilutin, sum er nevndur í teimum báðum fyrru stykkjunum, eru møttir á aðalfundi, men viðtøkan tó er samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum, verður eykaaðalfundur innkallaður, samsvarandi ásetingunum í hesum lógum, og kann lógarbroytingin/avtøkan av felagnum tá verða samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum, í sambandi við lógarbroyting, uttan mun til hvussu nógvir limir eru møttir á fundi og í sambandi við avtøku av felagnum, um í minsta lagi 25 % av limum felagsins eru møttir á fundi.

Standa atkvøðurnar á jøvnum, fellur málið.Grein 2, litra A, kann einans broytast við einmæltari aðal- ella eykaaðalfundarsamtykt.

7. Nevndarval og formansval fara fram við brævatkvøðugreiðslu eftir hesum reglum:

a. Uppskot til formansvalevni, saman við váttan frá tí uppstillaða, skulu vera felagnum í hendi í seinasta lagi 1.februar. Somuleiðis skulu uppskot til valevni til nevndina, saman við váttan frá tí uppstillaða, vera felagnum í hendi í seinasta lagi 15. februar. Formansvalevnini og nevndarvalevnin skulu lýsast á heimasíðu felagsins so skjótt freistin at stilla upp er farin.

b. Brævatkvøðuseðil verður sendur øllum limum felagsins við atkvøðurætti í prentaðum og frankeraðum brævbjálva í so góðari tíð, at limir úr øllum landinum náa at greiða atkvøðu.

c. Limir felagsins, kunnu í seinasta lagi vikudagin undan aðalfundinum greiða brævatkvøðu, við í seinasta lagi hendan dag, at lata grannskoðara felagsins brævatkvøðuseðil sín.

Grannskoðari felagsins skipar fyri hesari brævatkvøðugreiðsluni, soleiðis at valúrslitið verður kunngjørt á aðalfundinum.

d. d. Bert fullgildugir limir felagsins kunnu stilla lim upp sum valevni.

e. e. Tann sum verður stillaður upp

skal skrivliga vátta, at vilja taka við valinum.

f. f. Limur, sum greiðir atkvøðu, kann í mesta lagi greiða atkvøðu fyri so nógv-um av teimum uppstillaðu valevnunum, sum talið av teimum sum standa fyri vali.

g. g. Tey valevni, sum fáa flestar atkvøður eru vald, tó skulu ásetingarnar í § 11,stk.2 verða uppfyltar.

h. h. Tá val av eykalimum fer fram eru ásetingarnar í § 11, stk.4 galdandi.

### § 9 Eykaaðalfundur

1. stk. Eykaaðalfundur verður lýstur, um nevndin ynskir tað, ella um minst 25 limir 10 % av limunum krevja hetta, og teir samstundis skrivliga senda inn fráboðan um tað mál, teir ynskja viðgjørd á eykaðalfundinum.

2. stk. Slíkir fundir skulu verða hildnir í fyrsta lagi 3 dagar og í seinasta lagi 5 vikur aftaná at fundurin er kravdur.

Hevur málið skund kann freistin setast til 1 dag.

### § 10 Formaður

1.stk. Formaður felagsins verður valdur við brævatkvøðugreiðslu sambært § 8, stk. 7 og situr hann eitt 3 ára skeið.

Afturval kann fara fram. Uppskot til formansevni verður latið inn sambært ásetingunum í § 8, stk.7.

Valdur formaður bindir seg til at taka við fulltíðarstarvi í felagnum.

2.stk. Tann, ið fær flestar atkvøður er valdur formaður fyri eitt trý ára skeið.

Er bert eitt valevni til fastan formann, so er hesin valdur um viðkomandi fær ein meiriluta av greiddum atkvøðum. Fær formansvalevni ikki meirilutan av greiddum atkvøðum, skipar nevndin seg við formanni og skipar í seinasta lagi 6 vikur aftaná árliga aðalfundin fyri nýggjum formansvali sambært reglunum í grein 8, stk. 7. Nevndin ásetur freistina fyri nær brævatkvøðuseðlarnir skulu latast grannskoðara felagsins. Uppstillingarfreistin er í tílíkum førum 3 vikur undan at brævatkvøðuseðlarnir skulu verða latnar grannskoðara felagsins.

### § 11 Nevnd

1.stk. Nevndin er tað útinnandi liðið í felagnum og hevur um hendur leiðsluna í felagnum sambært avgerðum á aðalfundinum.

2.stk. Í nevndini sita 4 nevndarlimir og formaðurin. Nevndarlimir verða valdir fyri trý ár, soleiðis at:

1. árið standa 2 nevndarlimir fyri vali
2. árið standa formaðurin og 2 nevdarlimir fyri vali
3. árið er einki formans- ella nevndarval.

Av teimum fimm nevndarlimunum skal minst ein nevndarlimur vera pedagogur og minst ein vera hjálparfólk.

Nevndin skipar seg við næstformanni og skrivara.

Nevndin skipar sjálv fyri arbeiðsgongdini í serligari starvsskipan.

Avgerðir í nevndini verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, fellur málið.

3.stk. Nevndin hevur fund eina ferð um mánaðin, ella tá ið formaðurin ella helvtin av nevndarlimunum ynskir tað, og skal gerðabók felagsins undirskrivast av formanni og nevndarlimum felagsins. Í gerðabókina skulu skrivast samtyktir og stutt frágreiðing um viðgerðina av tí einstaka málinum. Nevndarlimur kann krevja møguliga serstøðu sína skrivaða í gerðabókina.

Fundarevni til vanligar nevndarfundir skulu sendast út minst 4 dagar áðrenn fundin.

Mál, ið limir felagsins ynskja viðgjørd, skulu vera nevndini skrivliga í hendi í seinasta lagi 4 dagar áðrenn nevndarfund. Í undantaksføri kann víkjast frá frammanfyri nevndu freistum.

4.stk. Eykalimir.Valdir verða 3 eykalimir. Av hesum eykalimum skal minst ein vera hjálparfólk og minst ein pedagogur. Eykalimir verða valdir á ársaðalfundinum hvørt ár og valskeiðið er tí eitt ár.

Reglurnar í § 8, stk.7, pkt. d og f eru eisini galdandi fyri val av eykalimum. Fyrstvaldi eykalimurin tekur við, tá ein av verandi nevndarlimum ferfrá ella ikki kann møta í longri tíð. Eykalimurin situr fyri viðkomandi nevndarlim, so leingi hesin er burturstaddur,tó ikki longur enn til komandi ársaðalfund, tá valskeiðið hjá eykaliminum gongur út.

Talið av atkvøðum, sum hvørt valevni fær, er avgerandi fyri, hvør er fyrst- næst- og trivaldur.

### § 12 Álitisfólk

1.stk. Álitisfólk felagsins verða vald og skulu virka sambært álitisfólkaavtaluni ímillum felagið og Føroya Landsstýri.

2.stk. Val av álitisfólki og varaálitisfólki fer fram á stovninum í mars mánaða líka ár og verða tey vald fyri eitt 2 ára skeið. Hvør stovnur velur 1 álitisfólk.Nevndin skal hava boð um úrslitið í seinasta lagið 2 vikur aftaná valið.

3.stk. Felagið skipar fyri minst 4 árligum álitisfólkafundum.

### § 13 Fíggjarlig viðurskifti

1. stk. Felagið heftir fyri fíggjarligu ábyrgdum sínum við øllum ognum sínum.Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

2. stk. Roknskapurin hjá felagnum og grunnum felagsins, ið eru:

Felagslívstrygggingargrunnurin, Húsagrunnurin og Aktións- og Upplýsingargrunnurin verða grannskoðaðir av tveimum internum grannskoðarum, sum verða valdir av aðalfundinum á hvørjum ári, og einum eksternum grannskoðara, ið verður setttur av nevndini. Roknskapurin skal vera liðugt grannskoðaður og latin nevndini í seinasta lagi 3 vikur undan aðalfundinum.

3.stk. Felagið verður bundið við tveimum undirskriftum, har onnur skal vera frá formanninum ella kassameistara næstformanni felagsins. Nevndin kann geva nevndarlimi ella starvsfólki fulltrú at binda felagið innan nærri ásettar karmar.

4. stk. Til at seta í veð ella keyp av fastari ogn krevst tó aðalfundarsamtykt og undirskrift á viðkomandi skjøl av formanninum saman við tveimum nevndarlimum.

### § 14 Arbeiðssteðgur

Undir verkfalli ella arbeiðssteðgi í samband við lønar- og sáttmálatrætur fáa teir limir, sum taka lut í tiltakinum útgoldið pening frá felagnum.Útgoldið verður eitt ávíst prosenttal av føstu mánaðarligu lønini. Nevndin ásetir prosenttali í hvørjum einstøkum tiltaki.

### § 15 Avtøka av felaganum

1. stk. Felagið kann bert avtakast ella samskipast við annað felag, um aðalfundurin góðkennir tað. Tá skal farast fram eftir § 8, stk.6. í hesum løgum felagsins.

2. stk. Aðalfundurin ger av, hvat peningur og ognir felagsins skulu nýtast til.

# HUGSA **HART!**

## – um Pisa og læring á dagstovnaøkinum.


- *Elin N. W. Tausen, Argir*
- *Útbúgvin pedagogur á Føroya Læraraskúla februar 2008*
- *Starvast á Dagstovninum í Løkjatúni, Argir, síðan mars 2008*
- *Nevndarlimur í Føroya Pedagogfelag mai 2009 – mars 2010*




Eg havi starvast sum námsfrøðingur í 2½ ár, so eg eri rættuliga „ung" á hesum starvsøki. Eg havi hesa tíðina, og meðan eg var lesandi, saknað eitt veruligt námsfrøðiligt kjak um ymisk viðskifti innan okkara starv. Ikki tí at námsfrøðingar eru ein serliga tigandi starvsbólkur, men onkursvegna hava vit ilt við at úttala okkum alment um faklig viðurskifti. Tað er synd fyri fakið, tí kjak skapar menning og at vit flyta okkum. Tað er nakað, vit námsfrøðingar eru noydd at fyrihalda okkum til, tí vitanin og kunnleikin innan okkara fak økist og mennist alla tíðina. Eitt av okkara týdningarmestu amboðum er reflektión yvir okkara arbeiði, og tí er tað at „hugsa hart" saman við øðrum eitt, sum kann verða við til at menna okkum sjálv og onnur. Tí fari eg at loyva mær at hugsa hart um nøkur viðurskifti, eg havi undrast á og reflekterað yvir seinastu mánaðirnar.

### Nýggju klæði keisarans og PISA.

Øll kenna vit ævintýrið um „Nýggju klæði keisarans". Søgan vil vera við, at tey føgru klæðini kundu avdúka, um ein var klókur ella ikki. Bara tey, ið sóu klæðnabúnan, vóru klók og kundu brúkast til nakað. Eingin tordi at siga, at tey ikki sóu klæðnabúnan, inntil eitt barn segði: „ Men hann er jú nakin!" Tá fór ein sjokkbylgja gjøgnum øll, og ja, hann er jú nakin, øll sóu tað sama!

Eitt sindur soleiðis upplivdi eg sjokkbylgjuna av Pisa-kanningunum her í Føroyum. Her gingu vit øll og hildu okkum verða so klók og einastandandi, og so kemur ein altjóða kanning og gevur eitt nógv øðrvísi úrslit, enn vit høvdu væntað. Hesar góðu pisakanningar hava so givið ringvirkningar í allari føroysku undirvísingarskipanini. Tað er gott, at vit eru farin at eftirhyggja okkara skúlaskipan, men eg haldi, at tað kann vera ein trupulleiki, at vit samstundis eru farin at tillaga hana soleiðis, at vit kunnu gerast betri fakliga á teimum økjum, Pisa-kanningin fevnir um, so sum lesiførleiki, støddfrøði o.s.fr. Vit skulu passa inn í altjóða kassan! Tey kreativu og nýskapandi fakini verða ofrað fyri tímar til tey „týdningarmiklu" fakini. Samstundis vita vit, at tað skal nýskapandi hugsunarháttur til, fyri at vit sum tjóð skulu halda fram at menna okkum her úti í Atlanshavi.

Ringvirkningarnir av Pisa merkjast eisini inni á dagstovnaøkinum, og hetta sama mynstrið er galdandi fyri hini Norðurlondini, kanska burtursæð frá Finnlandi, sum er nr. 1, tá tað kemur til Pisa.

Gjøgnum mínar egnu eygleiðingar, luttøku á NLS-sektorfundum og við at fylgja við í námsfrøðiligum tíðarritum havi eg gjørt mær nakrar hugsanir um gongdina á dagstovnaøkinum.

### Pisa og dagstovnaøkið

Í Norðurlondum er rákið, at dagstovnaøkið er flutt inn undir sama ráð, sum skúlaskipan liggur í. Tað sama er í Føroyum, har dagstovnaøkið er flutt frá Almanna- og Heilsumálaráðnum yvir í Mentamálaráðið, undir fólkaskúladeildina. Tað politiska rákið er at fáa skipaða læring/undirvísing til børnini so tíðliga sum gjørligt.







Hjá okkum sæst hetta aftur við ætlanum um at flyta tey 6 ára gomlu úr dagstovnaskipanini yvir í fólkaskúlaskipanina. Vit hava fingið krøv um námsætlanir fyri virksemi hjá dagstovnum, og vit kunnu bara vænta, at krøvini til økið fara at blíva fleiri. Eg ræðist ikki krøv, men eg ræðist eitt sindur tað manglandi orðaskifti um krøvini ella broytingarnar. Vit hava tann „fyrimun“, at vit kunnu læra av royndunum hjá hinum Norðurlondunum, tí at vanliga verða allar skipanir bert kopieraðar frá Danmark.

Sum sagt, so er eg nøggj á økinum, og eg kenni ikki sjálv til, hvussu tað náms_ frøðiliga økið er ment og broytt tey nógvu árini. Men eg haldi, at bara tíðarskeiðið við námsætlanum hevur ment økið positivt. Tað hevur gjørt tað lættari at seta orð á námsfrøðina, men tað er kanska eisini ymiskt frá stovni til stovn, og í teimum ymisku kommununum, hvussu arbeitt verður við námsætlanum, men samanumtikið tykist tað at vera semja millum námsfrøðingar um, at námsætlanir hava verið positivar fyri økið, hóast okkum enn vantar fyrireikingartíð til at kunna útinna arbeiðið til fulnar.

## Læring á dagstovnum

Tað, sum serliga hevur fangað mín áhuga seinastu tíðina, og sum eg gjøgnum lesnað og eygleiðingar eri farin at fordjúpa meg í, er læring á dagstovnaøkinum. Vit vita, at børn læra alla tíðina. Longu sum fostur læra tey. Lívslong læring er eitt nýtt slogan. Tað, sum eg haldi at kann blíva ein trupulleiki, er at orðið *læring* verður skilt sum *undirvísing*. Tað at geva upplýsingar víðari, fylla vitan á tóm kør. Onkursvegna haldi eg, at vit námsfrøðingar flyta skúlan inn á dagstovnaøkið fyri at kunna prógva, at vit eru meir enn ansing. Tað er lættari at dokumentera skipaða læring enn ta natúrligu læringina hjá barninum, sum vit uppliva hvønn dag. Tað er nógv lættari at skriva, at mánadag arbeiða vit við málsligari menning, týsdag hava vit rørslur, mikudag náttúru o.s.fr., enn at dokumentera ta læring, sum hendir alla tíðina í samspælinum millum børnini og við tey vaksnu. Tað sama við samlingini, har vit taka og ramsa dagarnar upp í saman, tí vit skulu læra børnini nakað. Tað hava vit altíð gjørt, so tað gera vit bara… uttan at hugsa um, hvørt barnið upplivir meining og samanhang við at ramsa dagarnar.

Eg haldi nevniliga, at seinasta ørindið í sanginum „Másin sigur pli,pli,pli“ lýsir so væl upplivingina av samanhangi hjá barninum. At tað er ikki bara at duga at ramsa djóramál, men upplivingin av læring, ið liggur aftanfyri …ein aha-uppliving:

*Lítli mín, hvat sigur tú,*
*fegin vil eg vita nú;*
*veit eg meir enn djóramál*
*býr í tínum ungu sál,*
*eygu tíni siga frá,*
*at tú meir enn djórið sá.*
*Svarar lítil piltur glaður:*
*„Eg vil verða rættur*
*maður.“*

*Hans A. Djurhuus*
*/J.C. Gebauer*

Børn eru so fantastisk. Tey læra alla tíðina av sínum egnum royndum, og so spyrja tey, tá tey hava brúk fyri upplýsingum um hvat og hví. Einki er so praktfult sum at fáa loyvi at vera við til, tá eitt barn fær ein aha-uppliving, tá barnið upplivir samanhang. Eitt dømi havi eg frá míni egnu dóttur, sum hevði arbeitt við leiri í skúlabólkinum. Tey høvdu fingið til uppgávu at gera ein varða. Óvitandi um, hvat ein varði var, gjørdi hon, sum henni bleiv víst. Nakrar mánaðir seinni vóru vit, familjan, ein túr í haganum. Tá rópar hon: „Mamma, hygg… her er tað, vit vórðu biðin um at gera í leir!“ „Ja, hatta er ein varði „ svaraði eg, „sum man brúkar at ganga eftir í haganum.“ „Á … nú skilji eg,“ svaraði hon. Hon hevði fingið eina uppliving av samanhangi og eina aha-uppliving, sum ger, at tá tosað verður um varðar, veit hon hvat tað er.

Børn læra gjøgnum egnar royndir. Læring hendir, tá børn eru aktiv, granskandi, spæla og eru virkin saman við øðrum børnum. Vit sum stovnar skulu ikki koma við innlæring ella skipaðari læring, men vit skulu skapa rammur og karmar, sum stuðla undir læringina hjá børninum. Vit skulu vera nærverandi og til staðar og stuðla undir barnið í tess læring.

Børn læra ígjøgnum spæl, men onkursvegna er tað at siga, at vit hava frítt spæl, blivið eitt fý–orð. Tað verður heldur tulkað, sum um námsfrøðingurin er heldur dovin og ikki tímir at vera aktivur saman við børnunum. Tað nýggja er, at nú eitur tað „Læring gjøgnum leik“. Men er tað talan um spæl, tá tað er ein vaksin, ið brúkar spælið sum eitt innlæringsamboð? Fyri at svara er neyðugt at hugsa, hvat spæl er, og tað fari eg ikki at koma inn á í hesari greinini. Meira at seta tingið uppá skák og fáa námsfrøðingar at hugsa og reflektera yvir, hvagar vit eru á veg við námsfrøðiliga arbeiðinum, og um hetta er tað, vit vilja.

## Eitt rák

Sum rákið er kring okkum nú, kunnu vit í framtíðini vænta, at enn fleiri faklig krøv fara at vera sett dagstovnaøkinum, og eisini testir av førleikunum hjá einstaka barninum. Fatanin, at fyrr vit fylla vitan og kunnleika í barnið, meira fáa vit fyri pengarnar, og betri „úrslit“ kemur út úr skúlaskipanini, finst eisini ímillum føroyskar politikarar. Tíverri vænti eg, at tað heldur verður øvut. Enn fleiri skúlatroytt børn, sum ikki orka pressið um, at vit skulu liggja ovarlaga í PISA, so vit kunnu vera stolt.

Sum sagt, krøv og avbjóðingar ræðist eg ikki, men tað krevur, at námsfrøðingar fylgja við í tí, sum hendir á økinum. At vit ikki eru bangin fyri at vera námsfrøðingar og viðurkenna, at tá tað kemur til dagstovnabarnið, so eru tað vit, ið vita best um menningina og læringina hjá barninum. At vit kenna okkum trygg í okkara fakliga førleika og tora at taka lut í samfelagskjakinum. At vit tora at seta spurningar og undrast, vera virkin, so vit seta okkara dám á tann veg, menningin av dagstovnavirkseminum fer, tí har eru tað vit námsfrøðingar, ið eru serfrøðin!





# MARGARINFABRIKKIN

## – ein mentanarligur **klekingardepil**

*Barnafestivalurin er eitt av fleiri tiltøkum at stuðla sjálvvirði og sjálvsálit hjá børnum og ungum*

*Orð og mynd: Tórfinn Smith*

Eitt av teimum heilt stóru og afturvendandi tiltøkunum hjá Margarinfabrikkini í Havn er barnafestivalurin, sum tey nú á triðja ári hava skipað fyri. Seinastu árini hava vit havt eitt ótal av ymiskum festivalum, og fleiri leggjast til, men hesin festivalur er grundleggjandi øðrvísi enn aðrir. Í fyrsta lagi er festivalurin hjá Margarinfabrikkini fyri børn, og fyri tað annað, sum eisini er tað týdningarmesta, at tað eru børnini, sum vanliga koma í Margarinfabrikkina, sum saman við starvsfólkum har skipa fyri festivalinum og luttaka sjálv í tí, sum har fer fram.

Salua Manai, varaleiðari, og Ingvør í Haraldsstovu, pedagogur á Margarinfabrikkini, greiða frá hugskotinum og endamálinum við barnafestivalinum. Tær ásanna, at hóast starvsfólkini á Margarinfabrikkini hava ymiskar dygdir, fakligar førleikar og áhugar, so hevur áhugin at fara út í náttúruna við børnunum ikki verið tann størsti, og tað hava onkur foreldur eisini viðmerkt.

### At seta sær mál

– Økið uttan um sjálva Margarinfabrikkina er ikki júst náttúruøkið, men vit hava Grasagarð í grannalagnum, og tað hildu vit kundi verið eitt frálíkt fríøki til okkurt uttandura tiltak. Eisini vóru vit greið yvir, at fíggjarliga rásarúmið hjá fleiri føroyskum familjum var avmarkað, og tí var hugsandi, at tað vóru mong børn, sum ikki untist at sleppa í Lalandia ella onnur líknandi støð uttanlands, og so var upplagt at gera okkurt spennandi barnatiltak her heima. Hugskotið búnaðist alt meira, sum tíðin leið, og ætlanin gjørdist alt størri. Okkum dámar sera væl at arbeiða við verkætlanum, tess størri, tess betri, tí tað vísir seg eisini, at setir tú tær stór mál og arbeiðir miðvíst, ber eisini til, sigur tær báðar, Salua og Ingvør, sum kortini ikki roknaðu við, at projektið bleiv so stórt, tá avtornaði. Tær roknaðu við, at tað fóru at koma nøkur fá hundrað fólk, men tað vísti seg, at talið á fólki, sum hetta fyrsta árið komu til barnafestival í Grasagarði, var umleið 2400 fólk.

### Dygdar undirhald

Í Margarinfabrikkini hava tey ymisk sonevnd verkstøð allan veturin, m.a. tónleikara-, dansi- og sjónleikarabólkar, og øll vóru líka íðin at venja til árliga undirhaldsbrakið sum til várs skuldi verða í Grasagarði, og júst hetta, at børnini sjálv eru við, er eitt av høvuðsendamálinum,- hetta at skapa børnunum ein leikpall.Men umframt at børnini úr Margarinfabrikkini sjálv skuldi manna pallin, hildu tey tað eisini vera eitt hugskot at fáa onkran uttanífrá.

Tað hildu børnini eisini vera spennandi, og sjálv skuldu tey sleppa at gera av, hvørjum tey skuldu bjóða við. Salua og Ingvør greiða frá, at tað høvdu børnini eisini sína meining um. Hugskotini vóru mong, og fyri at gera hetta av, varð atkvøtt. Avgerðin fall á Nicolai úr Danmark, sum børnini kendu frá danska barnagrandprix.

So var spurningurin, hvussu man ger at fáa eitt tílíkt navn higar. Hvør er kostnaðurin, hvønn setir man seg í samband við, og hvussu verður ein tílík avtala gjørd o.s.fr. Her vóru nógvir spurningar, sum skuldu svarast, og í hesari tilgongd skuldu børnini sjálvandi eisini vera við. Starvsfólkini eygleiddu, hvussu børnini fóru til verka. Onkur hevði bert áhuga í at atkvøða um, hvør skuldi koma higar, og aftur onnur vildu heldur enn fegin vera við í allari tilgongdini,- millum teirra løgdu Salua og Ingvør serliga merki til eina gentu,- ja hon verður einaferð fyriskipari, vóru tær sannførdar um. So ymiskt er við børnum, og tað skulu tey eisini fáa loyvi til…

### Hjálp frá foreldrum

Starvsfólkahópurin á Margarinfabrikkini er sum vera man avmarkaður, ikki minst tá hugsað verður um tær mangan stóru verkætlanir, tey arbeiða við, og tí kemur hjálp uttanífrá væl við. Tá børn og ung tekna seg

*Myndir: Margarinfabrikkin*







> ## Endamálið fyri Margarinfabrikkina:
>
> Margarinfabrikkin er eitt frítíðartilboð til børn og ung í Tórshavnar kommunu, frá 3. flokki til og við 18 ár.
>
> Her er rúm fyri øllum børnum og ungum í hesum aldri. Tó skal ein halda seg innan fyri teir karmar, sum settir eru í Margarinfabrikkini.
>
> Margarinfabrikkin er mentanarligur klekingardepil hjá børnum og ungum í Tórshavnar kommunu. Margarinfabrikkin er eitt cool og up to date stað.
>
> Vit ynskja, at Margarinfabrikkin er eitt stað, har børnini og tey ungu kenna seg væl og kenna seg trygg. Vit ynskja, at foreldur kenna seg trygg við at lata børn síni vera hjá okkum.







Myndir: Margarinfabrikkin

sum lim, verða foreldrini spurd, um tey eru sinnað at hjálpa til, tá okkurt er. Salua og Ingvør siga, at í flestu førum siga foreldur, at tey hava avmarkaða tíð til avlops og bera seg tí undan, men so eru onnur, sum fegin vilja veita eina hjálpandi hond. At foreldur eru erlig og siga frá, at tey hava ikki tíð ella umstøður, er eisini í fínasta lagi. Best at vera erligur, og tí vita tær eisini, hvønn tey kunnu heita á. Hóast foreldur ikki hava møguleika at hjálpa til, skal tað ikki halda nøkrum barni aftur í at koma higar, vilja Salua og Ingvør staðiliga gera greitt. Tær leggja aftrat, at tey ungu eru óføre at hjálpa til. Eitt nú í sambandi við barnafestivalin, sum neyvan hevði borið til, um ikki ein heilur hópur av teimum ungu hjálptu til við tiltakinum.

## Mennandi spurnarkappingar

Umframt teir ymisku møguleikarnar við m.a. billard, borðtennis, dansi og øðrum líknandi ítrivum skipa tey á Margarinfabrikkini fyri ymiskum tiltøkum, sum eisini eru bæði mennandi, spennandi og lærurík. Eitt av hesum tiltøkum eru spurnarkappingar við denti á ymiskt samfelagsligt innihald. Fleiri av børnunum eru ikki serliga køn í samfelagsligari ella almennari vitan, og tí eru hesar spurnarkappingar sera mennandi og læruríkar fyri tey, og tað dámar teimum sera væl. Salua og Ingvør siga, at tær greiða børnunum frá týdninginum av at lesa bløð og lurta eftir útvarpi um dagsins mál, og at tað kemur teimum til góðar í sambandi við spurnarkappingarnar.

## Virknir samfelagsborgarar

Eitt av endamálunum við Margarinfabrikini er at læra børn og ung samanhald, demokrati og ábyrgd, og tað verður m.a. gjørt við at hava fundir, har børnini siga sína hugsan og læra fundarsið, soleiðis at tey kenna seg sum virknar borgarar í Tórshavnar kommunu, sum føroyingar og heimsborgarar.

Í tráð við hetta hava tey annanhvønn mikudag sonevndar barnafundir, har tey taka upp ymisk evni. Tað kann vera um alt millum himmal og jørð, sum kann vera viðkomandi fyri børnini, m.a. tosa tey við jøvnum millumbili um happing. Hetta er við at læra børnini at vera á fundi og at tora at siga sína meining, siga Salua og Ingvør, sum ikki dylja, at tað samstundis gevur teimum stóra avbjóðing at lurta. Tað er m.a. á hesum fundum, at ymisk tiltøk verða fyriskipað, eisini barnafestivalurin.

Tey eldru børnini,- ella ungu rættari sagt, og her tosa vit um tey 13 til 18 ára gomlu, hava ikki altíð so stóran áhuga í skipaðum tiltøkum, men vilja heldur ráða sær sjálvum og njóta av teimum ítrivstilboðum, sum har eru.

## Íbirtarar fyri onnur

Margarinfabrikkin í Tórsgøtu er hin fyrsta av sínum slag í nýggjari tíð í Føroyum, og teirra royndir eru síðani eisini komin øðrum til góðar. Eingin orsøk er til, at hvør í sínum lagi uppfinnur djúpa borðiskin einaferð enn, og tí ræður um, at hvør lærir av øðrum, siga Salua og Ingvør, sum hava eitt gott samstarv við onnur ungdómshús í landinum.

Tær hava eisini fleiri dømi um, hvussu „ringarnir kunnu breiða seg í vatninum". M.a. nakrar gentur, sum í Margarinfabrikkini hava fingið undirvísing í dansi, og sum nú undirvísa øðrum ungum ymsastaðni í landinum.

– Eingin ivi um, at hetta er eitt spennandi og gevandi arbeiðspláss, sum vit brenna fyri og fegnast um, at tað eisini kann geva øðrum kveikjandi hugskot til spennandi og mennandi tilboð til børn og ung, siga tær báðar, Salua Manai og Ingvør í Haraldsstovu.

# GÓÐAR ROYNDIR AV MARTE MEO

*Ein ítøkiligur arbeiðsháttur at menna samspæls- og samskiftisførleika*



*Birgit Debess og Yvonna Hjaltalin hava góðar royndir av Marte Meo. Mynd Tórfinn Smith*

Í løtuni eru fleiri enn fýrati útbúnir Marte Meo terapeutar í Føroyum, og alt fleiri leggjast til, serliga á pedagogiska økinum.

Um mannagongdina við Marte Meo arbeiðsháttinum kann í stuttum sigast, at eitt videotól tekur upp, meðan starvsfólkið er saman við barninum. Marte Meo terapeuturin greinar síðani upptøkuna og finnur brot at vísa fyri starvsfólki. Soleiðis ber til at síggja, hvussu barnið í hvørjum einstøkum føri reagerar upp á tað, sum starvsfólkið sigur ella ger. Grundleggjandi hugskotið við hesum er at leggja sær í geyma tað, sum riggar, og harvið læra av tí. Tað skal sigast, at arbeiðshátturin verður eisini nýttur í samskifti millum vaksin, men verður kortini enn nýttur mest á dag- og serstovnum.

Birgit Debess, sum er leiðari fyri ráðgevingina á deildini fyri børn og ung í Tórshavnar kommunu, sigur, at tey, sum eru farin at nýta Marte Meo arbeiðsháttin, lata sera væl at. Videoupptøkurnar av einari støðu eru við til at geva starvsfólkunum svar upp á ivaspurningar – hvat var júst tað, eg gjørdi júst tá, sum vísti seg at rigga væl?! Og tað er jú hetta, sum videoupptøkan kann avdúka.

## Útbúgvingin í Føroyum

Í Føroyum eru nú trý fólk, sum hava nomið sær útbúgving í frálæru til Marte Meo arbeiðsháttin, og tí kann útbúgvingin, at verða Marte Meo terapeutur, fara fram her heima. Fyrstu av teimum fingu prógv í vár. Vanliga er Marte Meo útbúgvingin at rokna sum eitt ískoyti til eina grundútbúgving so sum pedagog-, lærara- ella aðra útbúgving, m.a. innan sjúkrahúsverkið.

Ráðgevandi leiðarin á deildini fyri børn og ung í Tórshavnar kommunu sigur, at júst hetta økið er ein rættiliga stórur partur av samlaða virkseminum hjá kommununi og harvið eisini av samlaða starvsfólkahópinum; og kommunan leggur stóran dent á, at starvsfólk eru so væl fyri fakliga sum gjørligt. Við einum tílíkum arbeiðshátti, sum kommunan hevur góðar royndir av, eisini innan familjuráðgeving og á barnaverndarøkinum, fáa børn á stovninum bestu menningarmøguleikarnar, samstundis sum ein faklig menning av starvsfólki fer fram.

## Fólk seta krøv

Tað var tann tíð, tá tørvurin á dagstovnum var so ovurhonds stórur, at foreldur vóru meira enn fegin, um tey fingu børn síni á onkran stovn. Krøv vóru ikki sett, men í dag er øðrvísi. Bæði foreldur og ikki minst starvsfólk seta í dag stór krøv til eitt mennandi innihald á stovnum, og til tess at økja um fakligu menningina hevur kommunan skipað eina pedagogiska ráðgeving, har Marte Meo er eitt av amboðunum. At fólk seta stór krøv í dag, sást eisini aftur í nøgdsemiskanningini, sum kommunan herfyri lat gera. Kanningin vísti m.a. greitt, at starvsfólk trívast best og foreldur eru best nøgd, har faklig menning er til staðar. Nú eru onkrir stovnar eisini farnir at kappast eitt sindur sínámillum við at leggja serligan dent á ymiskar fakliga grundaðar dygdir.

## Við foreldranna loyvi

Talgilda tøknin hevur gjørt so mangt lættari, tá tað ræður um myndir, men hon hevur eisini sínar vansar við sær við misnýtslu av myndum. Loyvi er tí fingið frá Dátueftirlitinum, sum setir ávísar treytir. Kommunan hevur í hesum sambandi orðað greiðar mannagongdir um, hvussu myndatøkur og harvið eisini videoupptøkur á stovnum kunnu fara fram og handfarast. Eingin mynd verður tikin ella videoklipp gjørt uttan við loyvi frá foreldrum. Frammanundan verður gjørd greið avtala við foreldur ella onnur avvarðandi.

# MENNA SAMSPÆL MILLUM BRÚKARA OG STARVSFÓLK

*Marte Meo er eitt avbera gott amboð, sum vit hava fingið stórt gagn av. Ikki minst á serstovnaøkinum, sigur Vera Bjørgvin, pedagogur á Virkni á Berjabrekku*

*Orð og mynd: Tórfinn Smith*

Verkhúsið Virkni er eitt verkhús fyri fólk, sum á ein og annan hátt bera brek. Í vár nomu tvey av starvsfólkunum sær útbúgving sum Marte Meo terapeutar. Vera Bjørgvin er annað teirra, og hon letur væl at teimum royndum, tey higartil hava gjørt sær á Virkni eins og á onkrum bústovni.

Avbjóðingar, ið kunnu stinga seg upp á einum tílíkum stovni, kunnu vera mangir og ymiskir, – eisini avbjóðingar, ið onkur vildi hildið vera smálutir, men sum hóast tað skulu takast í álvara, tá vit hugsa um, at tað eru fólk við menningartarni, vit arbeiða við. Her eru m.a. vaksin fólk, ið eru á menningarstigi sum børn, og onkur hevur als einki mál, og tað setur stór krøv til starvsfólkini, sigur Vera, sum greiðir frá onkrum dømi um, hvussu tey hava nýtt Marte Meo arbeiðsháttin.

– Talan kann vera um onkran, sum enn ikki hevur lært at sita til borðs, og hetta er kanska eisini til ampa fyri sosiala samspælið. Starvsfólkini fáa tá til uppgávu at orða ein spurning – seta orð á, hvat tey ynskja, at brúkarin skal læra – og síðani gera vit eina ætlan, hvussu vit kunnu hjálpa viðkomandi brúkara til betri borðvanar. Tá vit hava fingið tey formellu loyvini frá avvarðandi, seta vit eitt videotól upp, sum tekur upp samspælið millum brúkaran og starvsfólkið. Síðani greini eg upptøkuna og geri brot av tí, ið riggaði í samspælinum og vísi tað fyri starvsfólkinum at arbeiða víðari við. Hesa mannagongd kunnu vit so endurtaka nakrar ferðir, og við videoklippunum kunnu vit síggja, hvussu gongdin hevur verið, síðani vit byrjaðu. Marte Meo er ein arbeiðsháttur, har vit leggja dent á alt tað jaliga í samspælinum millum brúkara og starvsfólk og arbeiða víðari við tí. Eitt av høvuðsendamálunum er eisini, at starvsfólk venja seg við at seta orð á sínar gerðir, sigur Vera.



*Vera Bjørgvin, pedagogur og Marte Meo terapeutur á Virkni, sigur, at tey hava góðar royndir av Marte Meo.*

*„Marte Meo er ein arbeiðsháttur, har vit leggja dent á alt tað jaliga í samspælinum millum brúkara og starvsfólk og arbeiða víðari við tí.“*

### Riggar sera væl

Vera Bjørgvin letur væl at teimum royndum, tey higartil hava havt av Marte Meo arbeiðsháttinum. Ein arbeiðsháttur, sum kann og verður brúktur í mongum høpi. Í grannalondunum hevur hátturin verið brúktur í fleiri ár, har tey eisini hava havt góðar royndir, m.a. í samspæli við narkomanar, fólk við menningartarni, børn og minnisveik. Minnisveik gerast ofta harðlig orsakað av, at tey kenna á sær, at tey starvsfólk, sum eru um tey, ikki skilja tey. Tí hevur samspælshátturin sera nógv at siga, og har eru videoupptøkurnar góðar sum amboð at ítøkiliggera tað, sum fer fram í samspælinum, bæði millum starvsfólk og brúkara og starvsfólkanna millum, greiðir Vera frá.

Føroysku Marte Meo terapeutarnir hava skipað seg í felag til tess at menna sínar førleikar, at skipa fyri ávísum skeiðum, og yvirhøvur at læra av royndum hvør av øðrum.

# MARTE MEO GER MUN

*Framferðarhátturin tekur støði í ítøkiligum hendingum úr gerandisdegnum, og hann hevur riggað væl, sigur Dagmar Clothier, pedagogur á dagstovni*

*Orð og mynd: Tórfinn Smith*

Dagmar Clothier er pedagogur á dagstovninum Sólareyganum í Havn, og hon hevur hesi bæði seinastu árini, hon hevur arbeitt við Marte Meo, góðar royndir av arbeiðsháttinum.

Um hví hon fekk áhuga fyri og vildi royna Marte Meo greiðir Dagmar frá:

– Her eru, eins og á øðrum dagstovnum, børn í øllum dagstovnaaldri, og tey flestu klára seg væl og mennast, sum tey skulu á øllum økjum, tað veri seg sosialt, kensluliga, motoriskt og málsliga. Tey hava gott sjálvsálit og eina positiva sjálvsmynd. Sjálv haldi eg, at tað finnast ikki problembørn, men summi børn kunnu t.d. hava ein óhóskandi atburð, ið ger tað torført hjá teimum at koma í positivt samspæl við onnur børn og vaksin, og hesi børn hava tá eyka tørv á hjálp fyri at koma úr hesum negativa mynstrinum. Og spurningurin er, hvussu vit best kunnu hjálpa tí.

– Tað er ikki altíð, at tú sær hvønn smálut í tí, sum hendir í samskiftinum – ella tørvandi samskiftinum – barnanna millum ella millum barnið og starvsfólk, men her roynist Marte Meo arbeiðshátturin væl, og hesum kann Barna- og Ungdómsdeildin hjá Tórshavnar kommunu hjálpa okkum við. Haðani kunnu vit fáa ein Marte Meo ráðgeva at hjálpa okkum, sigur Dagmar og greiðir frá, hvussu tað kann verða gjørt:

– Tað fer fram á tann hátt, at vit orða ein spurning í sambandi við trupulleikan, sum vit vilja hava svaraðan. Spurningurin kann t.d. vera, hvussu vit kunnu hjálpa hesum barninum við at koma í samspæl við onnur børn, ella hvussu vit kunnu hjálpa barninum at fá eina positivari sjálvsuppfatan. Næsta stigið er, at ráðgevin tekur upp á video, sum er eitt grundleggjandi amboð í Marte Meo arbeiðsháttinum, eina skipaða og eina óskipaða støðu. Skipaða støðan er, tá tað eru starvsfólkini, sum stíla fyri. Tað kann vera í sambandi við, tá øll eta sín matpakka, ella vit spæla okkurt spæl. Óskipaða støðan er, tá børnini av sínum eintingum takast við tað, tey sjálv tíma best.

Men áðrenn farið verður undir eina tílíka tilgongd, eru foreldrini kunnað um trupulleikan og spurd, um tey vilja, at vit starvsfólk fáa ráðgeving frá einum Marte Meo ráðgeva. Ráðgevingin gongur út upp á, hvussu starvsfólkið m.a. gerst betri at møta barninum og gerst betri til skapa umstøðurnar á stovuni soleiðis, at øll hava sama møguleika at mennast á ein positivan hátt.



*Dagmar hevur arbeitt við Marte Meo í eini tvey ár og letur sera væl at.*

### Afturmelding

Nakrar dagar seinri kemur Marte Meo ráðgevin aftur á stovnin fyri at geva afturmelding upp á videoupptøkurnar saman við starvsfólkunum. Upptøkurnar verða eftirmettar brot fyri brot, og støði verður tikið í tí jaliga úr upptøkunum. Út frá fyrstu upptøkunum verður so nýggjur arbeiðssetningur gjørdur, sum so miðvíst verður arbeitt við, inntil næsta upptøka verður. Á henda hátt kunnu vit eygleiða eina miðvísa framgongd, greiðir Dagmar frá og leggur afturat, at júst við at eygleiða videoupptøkurunar ber til ítøkiliga at fylgja við, um tey eru á rættari leið.

Dagmar leggur dent á, at foreldrini eru við í tilgongdini alla tíðina og verða kunnað um afturmetingarnar frá ráðgevanum, og um tey vilja, so kunnu tey eisini síggja upptøkurnar, sum gjørdar eru.

Tað, sum er so gott við hesum arbeiðsháttinum, er, at hann byggir á tað, sum riggar … og at tað í arbeiðsgongdini gerst ein natúrligur máti at arbeiða og hugsa uppá í relatiónini við børn og vaksin.

# Nýggjur dagstovnur í Kvívík

## – Ein íløga í framtíðina



*Vit hava fingið tað, vit ynsktu sigur Dánjal Petur Müller, bygdaráðsformaður.*

*Eitt fíggjarliga tungt tak hjá kommununi, men væl latnir pengar, heldur bygdarráðsformaðurin*

Orð: Tórfinn Smith

Hóast pláss er fyri 100 børnum á dagstovninum í Kvívík, eru higartil kortini ikki fleiri enn tilsamans 60 børn á vøggustovuni, barnagarðinum og frítíðarstovuni, sum alt húsast undir somu lon. Dánjal Petur Müller, bygdarráðsformaður, leggur dent á, at hetta er ein íløga, sum eisini skal røkka nakað inn í framtíðina. Hann heldur, at alt ov mong dømi eru um, at kommunur gera tílíkar íløgur, sum vísa seg at vera ov lítlar, tá tær skulu takast í nýtslu, og ta støðu vildu tey í Kvívíkar kommunu ikki koma í. Hetta hevur verið eitt stórt tak hjá kommununi, men avgjørt neyðugt, sigur hann. Og sum vera man hava tey gjørt alt fyri at røkka einum so góðum úrsliti sum gjørligt. Starvsfólk hava verið við í allari tilgongdini, og sama við øllum viðkomandi stovnum, so sum Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Arbeiðseftirlitinum og Brunaumsjónini, sum vórðu tikin við í verkætlanina frá fyrsta degi. Tað heldur bygdarráðsformaðurin eisini vera av sera stórum týdningi, soleiðis at ymiskar neyðugar tillagingar eru gjørdar so hvørt, soleiðis at tey ikki komu í ta støðu at koma afturumaftur við nøkrum, tá bygningurin stóð liðugur, tí tað hevði bert kostað óneyðugar eyka krónur. Nýggi dagstovnurin er eisini bygdur so orkusparandi sum gjørligt.

Frammanundan hevur dagstovnaøkið hildið til í trimum støðum í kommununi. Dagrøktin var í einum privathúsum í Leynum, sum kommunan leigaði og innrættaði til endamálið, frítíðarstovan helt til í einum húsum í Kvívík, og í gomlu umbygdu lærarahúsunum hildu vøggustovan og barnagarðurin til. Karmarnir gjørdust ov trongir at nøkta tørvin, og ópraktiskt var at halda til í fleiri ymiskum hølum. At hava alt savnað á einum stað heldur bygdarráðsformaðurin hava fleiri fyrimunir.

Kvívíkar kommuna fevnir um bygdirnar Kvívík, Skæling, Leynar, Stykkið og Válin. Bygdarráðið roynir alla tíðina at hava nøkur grundøki tøk, so áhugað hava ein møguleika at seta búgv í kommununi. Nýggj útstykking í Leynum er júst liðug, og fólk vísa henni áhuga, men bygdarráðsformaðurin sigur, at nógva prátið um kreppu ger, at fólk eru sera varin við at gera eina størri íløgu.

# Stórt frambrot

## við nýggja dagstovninum





*– Ber boð um, at tit hava virðing fyri bæði børnum, teirra familjum og teimum starvsfólkum, sum her skulu starvast, segði forkvinnan í Pedagogfelagnum í sambandi við, at Kvívíkar kommuna herfyri tók nýggja dagstovnin í nýtslu*

Í dag er meira attraktivt at búgva í Kvívíkar kommunu, segði Maud Wang Hansen, forkvinna í Pedagogfelagnum, í røðu síni, tá nýggi dagstovnurin Frammi í Forna í Kvívík varð tikin í nýtslu, og hon takkaði kommununi fyri at hava tikið eitt sera skilagott stig við einum nýggjum dagstovni, sum ber boð um nýggjar tíðir. Maud segði, at kommunan við at skapa bestu karmar á dagstovnaøkinum hevur víst í verki, at hon vil fremja broytingar og menning á økinum, og tað helt hon hava sera stóran týdning.

– Vit byggja okkara heim so góð og livilig sum yvurhøvur til ber, og tað sama eiga vit at gera, tá tað snýr seg um at byggja dagstovnar, tí hvørt einstakt barn í Føroyum livir nú nógvar av dagsins tímum á dagstovni, og tað skulu vit ikki vera kedd av. Vit eiga bara at tryggja okkum, at karmarnir eru hóskandi, og best um teir eru gjørdir til rætta endamál, segði Maud, ið eisini fegnaðist um tær góðu arbeiðsumstøðurnar, sum starvsfólkini hava fingið. Forkvinnan í Pedagogfelagnum helt tað vera av stórum týdningi, at leiðslan á dagstovninum hevur verið við í bygginevndini, og at starvsfólk annars hava verið við, tá týdningarmiklar avgerðir hava verið tiknar í sambandi við nýggja dagstovnin, og at tað áttu allar kommunur eisini at gjørt.

Maud hugleiddi um, hvussu samspælið fyrr var millum børn og tilkomin, áðrenn vit kendu til skipaðar dagstovnar. Børnini fingust við tað, sum umstøðurnar høvdu at bjóða, og tá tey vóru eitt sindur størri, sluppu tey í hagan, á fjall ella út at dyrgja saman við teimum vaksnu. Líka strævið, tað kundi tykjast, helt hon, at allar orsøkir eru til at minnast aftur á góðar og stuttligar løtur, sum børn og vaksin høvdu saman.

– Í dag síggja vit ikki børnini millum tey vaksnu longur. Nú hevur samfelagið eina aðra ábyrgd, og tað er at byggja góðar dagstovnar, soleiðis at børnini saman við vælútbúnum starvsfólkum, sum brenna fyri sínum arbeiði, taka lut í einum mennandi umhvørvi, har stórur dentur er lagdur á, at børnini vaksa upp sum dugnaligir, samvitskufullir og kreativir samfelagsborgarar. Tað er eisini sera týdningarmikið, at børnini eru ment í nóg stóran mun til at byrja í skúla, og er tað mín vón, at vit í framtíðini koma at síggja eitt natúrligt samstarv millum lærar og námsfrøðingar, og at børnini, so leingi tørvur er á tí, fáa møguleika at ganga á dagstovni, eisini eftir skúlatíð, segði Maud, sum ynskti børnum, foreldrum, starvsfólkum, politikarunum og borgarunum annars til lukku og góða eydnu við nýggja dagstovninum.

# GÓÐUR **KARMUR** UM **MENNANDI** INNIHALD



*Unni Joensen, varaleiðari, og Siborg Arge, leiðari, eru sera fegnar um góðu arbeiðsumstøðurnar á nýggja stovninum, Áarlon, sum stovnurin eitur. Mynd Tórfinn Smith*

*Orð og mynd: Tórfinn Smith*

Samstundis sum skúlarnir byrjaðu aftur nú eftir summarfrítíðina, lat nýggi dagstovnurin í Kvívík dyrnar upp fyri teimum smæstu børnunum í kommununi. Sera snotiligur flagtaktur bygningur, sum liggur væl í lendinum, ovarlaga í bygdini. Har er pláss fyri 98 børnum, 30 í vøggustovu, 48 í barnagarði; og í frítíðarstovuni, sum er í niðaru hæddini, er pláss fyri 20 børnum.

Siborg Arge, sum er leiðari á dagstovninum, fegnast sum vera man um góðu umstøðurnar, sum hon eisini sjálv hevur havt møguleikar til at seta síni fingramerki á. Siborg, sum hevur arbeitt við børnum í Kvívíkar kommunu síðani 2006, hevur nevniliga verið við í tilrættaleggingini av nýggja dagstovninum líka frá byrjan, tá hon eisini varð vald í bygginevndina. Javnan hevur hon eisini ráðført seg við sínar starvsfelagar, og júst hetta, at starvsfólk eru við til at skipa sítt arbeiðspláss, heldur hon hava alstóran týdning. Hon hevur eisini verið við at vitja aðrar stovnar at kunna seg um, hvussu onnur hava skipað seg. Úrslitið, nú dagstovnurin stendur liðugur, eru starvsfólkini eisini sera væl nøgd við. Stovnurin lýkur øll krøv, eisini í sambandi við rørslutarnað, sum allir viðkomandi stovnar hava góðkent. Handikapvesi er á báðum hæddum, og rúm er gjørt til hoyri- og talilærara.

## Mennandi innihald

Eitt eru fysisku karmarnir, annað, sum ikki minni ræður um, er at skapa eitt mennandi innihald, og tí hava starvsfólkini arbeitt nógv við.

– Vit lurta altíð eftir, hvat rørir seg uttan um okkum og taka støði í tí, børnunum tørvar. Teirra áhugi verður eisini avgerandi fyri, hvat hendir á stovninum, og stórur dentur verður lagdur á, at børnini fáa møguleika at taka lut í ymiskum ítrivum. Tað geva hølisumstøðurnar eisini góðar møguleikar fyri, m.a. við smáum verkstøðum til mangt og hvat.

Siborg greiðir frá, at stovnurin skal virka rættiliga opin, soleiðis at børnini fáa møguleika til eisini at vera saman við børnum á øðrum stovum, eins og ætlanin er, at fólk uttanífrá kunnu koma at vitja og práta við børnini á stovninum. Náttúrugivnu umstøðurnar uttan um stovnin geva eisini ríkar møguleikar fyri tøttum sambandi við náttúruna. Talan er ikki longur um tilboð til ansing, men um menning og læru, sigur Siborg.

Á dagstovninum í Kvívík leggja tey eisini stóran dent á, at starvsfólkini eru so væl fyri sum gjørligt, og tí luttaka tey javnan í ymiskum skeiðum.

– Vit kunnu ikki annað enn at gera okkara allarbesta, nú vit hava fingið so góðar umstøður, sum dagstovnurin gevur okkum, sigur dagstovnaleiðarin.













1. *Starvsfólkini læra at sløkkja eld*
2. *Stovnurin og umhvørvið rundan um*
3. *Starvsfólkini læra fyrstuhjálp*
4. *Vit baka í barnakøkinum. Umstøður eru hjá børnunum at fylgja við í teirra hædd*
5. *Børnini eru forvitin eftir at vita, hvat hendur á stovninum, áðrenn tey byrja*
6. *Frítíðarstovubørnini máta dl og litrar.*

# UMHVØRVISÁTAK
# VIÐ ARBEIÐSSKAPANDI BURTURKAST



*Orð og myndir: Tórfinn Smith*

Hvussu eitt umhvørvisátak kann samskipast við mennandi arbeiðsskapandi tiltøk, er samstarvið millum brennistøðina á Hjalla og Dugna eitt gott dømi um. Eitt av umhvørvisátøkunum hjá Tórshavnar kommunu var at minka um rusknøgdina, sum skuldi brennast, og til tess var avrátt við Dugna um at skipa eitt endurnýtsluátak. Dugni hevur til endamáls at stuðla arbeiðstarnaðum við mennandi virksemi og útbúgving, og tí var eitt tílíkt samstarv natúrligt, og tað hevur riggað væl, síðani tað byrjaði fyri hálvumtriðja ári síðani.

Á móttøkuplássinum við brennistøðina eru bingjur, har fólk kunnu lata tað í, sum tey vilja sleppa av við, og sum tey halda, at onnur kunnu fáa gagn av. Síðani taka starvsfólkini hjá Dugna sær av hesum. Lutirnir verða kannaðir og reinsaðir, og er onkur smávegis umvæling neyðug, verður tað eisini gjørt. Síðani fara vørurnar prísmerktar í vælskipaða endurnýtsluhandilin, sum heldur til í einum bygningi beint omanfyri brennistøðina.

## Í arbeiðsvenjing

Hjá Dugna á Hjalla eru seks ársverk. Trøndur Ennistíg, starvsfólk í Tinghúsinum, sum virksemið hjá Dugna á Hjalla verður nevnt, greiðir frá, at nøkur av teimum, sum arbeiða har, eru í heiltíðarstarvi, og onnur koma og fara, eftir at tey hava verið har eina tíð. Tey, sum eru í føstum starvi, eru fólk, ið hava fingið tillutaða fyritíðarpensión. Harafturat koma næmingar á Dugna, ið eru undir royndarætlan ella endurútbúgving í arbeiðsvenjing í Tinghúsinum. Tey sleppa at royna seg við góðari vegleiðing frá starvsfólki, sum eisini meta um, nær hesi eru búgvin at átaka sær eitt vanligt arbeiði, og hvat arbeiði hóskar teimum best.

## Fleiri sólskinssøgur

Trøndur veit at siga frá fleiri sólskinssøgum, hvussu hesi eru komin fyri seg og hava fingið eitt hóskandi arbeiði, har tey stórtrívast. Trøndur hevur góðar royndir av privatum arbeiðsgevarum, sum eru sera jaligir



*Trøndur Ennistíg, her staddur á verkstaðnum, starvast hjá Dugna á Hjalla. Handilin á Hjalla er opin mánadag til mikudag frá 10 til 16. Mynd:Tórfinn Smith*







*Elin Lindenskov, forkvinna í Umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Býráð, handaði Trøndi hetta heiðursskjalið fyri besta umhvørvisátak 2010*

at lata fólk koma í arbeiði, fyrst sum eina roynd, og oftast riggar so væl, at hesi hava fingið varandi fast arbeiði. Onkur í vardum starvi. Hetta er jú fremsta endamálið hjá Dugna, at arbeiðstarnað fáa møguleika at endurútbúgva seg og fáa møguleika at arbeiða.

## Handilin væl vitjaður

Trøndur Ennistíg ásannar, at hann var als ikki fullgreiður yvir, hvussu fór at gangast við átakinum við endurnýtslu, tá tey byrjaðu. Mangir ivaspurningar vóru. Fingu tey nóg mikið frá fólki at arbeiða við. Hvussu fór tiltakið at verða móttikið, og fóru fólk at koma í handilin. Men í dag kann hann bert fegnast um, at alt hevur gingið av tí besta. Tað stendur ikki á at fáa nóg mikið at arbeiða við, arbeiðsfólk stórtrívast, og handilin verður sera væl vitjaður. Tá handilin letur upp mánamogrun kl. 10, er ikki óvanligt, at fleiri standa og bíða, til dyrnar verða latnar upp, og sjáldan kemur tað fyri, at fólk fara tómhent avstað aftur.

Í „Tinghúsinum“ fæst alt møguligt fyri at siga tað stutt. Bara ikki bøkur og klæðir, tí tað taka ávikavist Reyði Krossur og Blái Krossur sær av. Eingin orsøk at kappast við tey, tí her er ríkiligt av øðrum, sigur Trøndur, sum bar ótta fyri, at kreppan gjørdi, at minni fór at koma í teirra bingjur, men so var ikki. Tað kemur framvegis líka nógv frá fólki í endurnýtsluna, men samstundis koma væl fleiri fólk í handilin nú.

## Ársins umhvørvisátak

Í ár lat Agenda 21 Dugna umhvørvisvirðisløn fyri átakið á Hjalla og á Kambsdali. Tað fegnast Trøndur sum vera man eisini um.

– Okkara fremsta uppgáva er tó at stuðla arbeiðstarnaðum, men kunnu vit samstundis rætta umhvørvinum eina bøtandi hond, so ongantíð betur, sigur Trøndur.

# SPENNANDI **AVBJÓÐINGAR** VIÐ **NÝGGJUM** OG **ØÐRVÍSI** KRØVUM

*– Eftir at kunngerðin um virksemi o.a. á dagstovnum og dagrøktum er sett í gildi, verður ein av uppgávunum hjá Námsfrøðiligu Ráðgevingini at hava eftirlit við, tryggja og samstarva um, at øll børn fáa nøktandi og mennandi dagstovnatilboð, sigur Jórun V. Niclasen, námsfrøðiligur ráðgevi hjá Klaksvíkar kommunu*

Fleiri broytingar hava verið á dagstovnaøkinum seinastu árini. Í 2000 kom dagstovnalógin, síðani broytingin av grein 5 í dagstovnalógini og nú til seinast kunngerð um virksemi o.a. á dagstovnum og dagrøktum.

Hetta eru spennandi avbjóðingar, sum seta nýggj og øðrvísi krøv til okkum, sum starvast á dagstovnaøkinum.

Sjálv starvist eg sum námsfrøðiligur ráðgevi hjá Klaksvíkar Kommunu. Eftir at kunngerðin er sett í gildi, verður ein av uppgávunum hjá Námsfrøðiligu Ráðgevingini at hava eftirlit við, tryggja og at samstarva um, at øll børn fáa nøktandi og mennandi dagstovnatilboð í Klaksvíkar Kommunu.

Í greinini verður hugt at lógargrundalagnum og endamálinum fyri námsætlanum; eisini verður komið inn á hugtakið læra og læruumhvørvi.

## Lógargrundarlag

Í kunngerðini stendur, at *dagstovnurin eigur at seta orð á, hvørji námsfrøðilig mál eiga at vera nádd fyri hvønn aldursbólk av børnum, og hvussu hetta skal setast í verk.*

Um dagrøktarskipanina sigur kunngerðin, at *dagrøktarskipanin ger eitt námsfrøðiligt endamál fyri hvørt dagrøktarheim, ið er knýtt at skipanini, sum í størst møguligan mun tekur atlit at hvørjum einstøkum barni.*

Allir dagstovnar eiga at byggja sítt virksemi og innihald við støði í tí virðisgrundarlag, sum er ásett í dagstovnalógini og teimum altjóða sáttmálum, sum Føroyar hava bundið seg til. Pedagogar eiga serliga at hava í huga ST-sáttmálan um barnarættindi.

Barnarættindasáttmálin varð samtyktur av ST í 1989 og staðfestur á Føroya Løgtingi 9. apríl 1992. Við staðfestingini av Barnarættindarsáttmálanum hava Føroyar bundið seg til at hava barnsins besta í huga í øllum, sum hevur við børn at gera, soleiðis sum § 3 í sáttmálanum ásetir.

Myndugleikarnir eiga at tryggja, at stovnar og tænastur, sum hava ábyrgdina av umsorgan og verju av børnum, taka støði í teimum ásetingum, sum hesir altjóða sáttmálar seta.

Hugburðurin til børn og fólkaræði í sáttmálanum um barnarættindi er eitt nýbrot, tí er neyðugt at geva sær stundir at umhugsa og menna eina ætlan um rættindi hjá børnum á dagstovnum, og hvussu rættindini hjá børnum skulu skiljast, og hvussu tey kunnu gerast ein partur av gerandislívinum á dastovnunum. Børn skulu hava ávirkan á egið lív, og ein partur av uppalingini er at geva børnum møguleika at taka lut í fólkaræðnum.

## Endamál

Í viðmerkingunum til kunngerðina er ásett, at námsfrøðiligu stevnumiðini eiga at vera av fakligum slag og áseta tær mennandi og mentandi skyldur, sum dagstovnar og dagrøktir hava mótvegis børnum. Metast skal um ansin fyri spæli, og arbeiðshættirnir skulu í høvuðsheitum ásetast, og innanhýsis meting av arbeiðsdygdini skal gerast. Endamálið við stevnumiðunum er at geva leiðarum, pedagogum og starvsfólkum yvirhøvur ein karm um virksemið. Leiðarin hevur ábyrgd av, at virksemið á dagstovnunum hevur støði í stevnumiðunum.

Stevnumiðini eiga eisini at vera ein kunning til foreldur og kommunu um, hvat virksemi fer fram á dagstovninum, og hvørjar ætlanir eru lagdar fyri at náa málunum.

Stevnumiðini skulu vísa á týdningin, sum hugburður, kunnleiki og førleiki hjá pedagogum hava fyri at møta, skilja og ala upp børn, so tey kunnu gerast virknir samfelagsborgarar í einum demokratiskum samfelag.



*Jórun V. Niclasen*

## Námsætlanir

Flestu av grannalondum okkara hava sett í gildi námsætlanir á dagstovnaøkinum. Tað er tó ymiskt, hvussu umfatandi námsætlanirnar eru í vavi, og hvussu nógv tær gera seg galdandi í dagliga námsfrøðiliga arbeiðinum á dagstovnunum.

Higartil hevur einki ament kjak verið um at seta í verk námsætlanir í Føroyum.

Tá námsætlanir vórðu samtyktar í Danmark í 2004, varð nakað av kjaki millum danir um fyrimunir og vansar við námsætlanum.

Fólk vóru rættiliga ymisk á máli um hetta. Spurnartekin varð sett við endamálið við námsætlanum; m.a., um tað vóru politikararnir ella pedagogarnir, sum skuldu seta námsfrøðiligu málini, vóru námsætlanir ein liður í at standardisera, hvat børn skulu duga fyri at verða aldurssvarandi, var vandi fyri, at margfeldið (fjølbroytnið), sum í dag er á dagstovnunum, fór at hvørva? Av fyrimunum kunnu millum annað nevnast, at námsætlanir altíð skulu vera ein dynamisk prosess, og tær fara tí at tryggja, at námsfrøðiliga arbeiðið á dagstovnunum ikki fer at steðga upp.

At fyrihalda seg tilvitað um námsfrøðiligt arbeiði á dagstovnunum er ikki nakað nýtt fyribrigdi, men við kunngerðini um virksemi á dagstovnunum verður beinleiðis ásett, at arbeitt verður miðvíst við læru og at námsfrøðiliga arbeiðið verður eftirmett.

Eftir míni meting skulu námsætlanir skiljast sum karmur um at fyrireika, útinna og eftirmeta námsfrøðiliga arbeiðið á dagstovninum. Eisini skulu tær eggja til umhugsan, ikki bara um egið virksemi, men eisini felags námsfrøðiligt virksemi á staðnum. Námsætlanirnar skulu tí byggja á námsfrøðilig og etisk grundsjónarmið til umhugsan heldur enn á ávís krøv um, hvat eigur at verða gjørt á tí einstaka dagstovninum.

Í stuttum kunnu vit siga, at námsætlanir skulu siga, hvørji mál skulu náast, og hvussu tey skulu náast; tað vil siga, at tað snýr seg um at læra.

## Implementering (seta í verk)

Ætlanin er, at námsætlanirnar skulu setast í gildi í Føroyum í 2011.

Hetta fer at hava broytingar við sær, bæði á kommunala økinum og á dagstovnunum. Dagstovnalógin og námsætlanirnar eru ein politisk avgerð. Eftir mínum tykki er tað umráðandi, at øll, her hugsi eg bæði um kommunur og starvsfólk á dagstovnaøkinum, eru væl kunnað um, hvat endamálið er við námsætlanum, og hvørjar broytingar tað fer at hava við sær.

Uppgávan hjá kommununum verður at tryggja, at námsætlanir verða gjørdar fyri hvønn dagstovn, og at tær verða fylgdar. Kommunalu myndugleikarnir hava eisini ábyrgdina av, at dagstovnarnir fáa møguleika at menna seg fakliga, so tey kunnu liva upp til fakligu krøvini, sum eru í kunngerðini.

Uppgávan hjá dagstovnunum verður at menna seg fakliga til krøvini, ið sett eru, og at børn hóast ymiskan tørv fáa eitt hóskandi dagstovnatilboð. Námsætlanir eru ein dynamisk prosess, ein tilgongd, sum

støðugt er fyri broytingum; tað veldst um børn og vaksin. Námsætlanin verður altíð tengd at, hvørji børn og starvsfólk eru á dagstovninum.

Eg haldi tað verða umráðandi, at allir partar eru væl fyrireikaðir, her hugsi eg um kommunur og starvsfólk. Um allir partar ikki eru tilvitaðir um broytingina, kann hugsast, at kommunalu myndugleikarnir ikki kenna sær ábyrgd av námsætlanum. Ein annar vansi kann verða, at pedagogar, ið skulu arbeiða við og umsita námsætlanir, ikki kenna sær ognarrætt til tær orsakað av, at námsætlanir eru politiskar samtyktir.

## Læra

Í hesum førum skal læra ikki skiljast sum vanlig innlæring, har tann betrivitandi lærir tann minni vitandi. Hugtakið at læra alt lívið er ein ábending um, at læra fer fram alt lívið.

Tað finnast nógvar meiningar, áskoðanir, ástøði um, hvat tað er at læra, men børn læra alla tíðina, eisini um einki er fyriskipað av øðrum um, hvat tey skulu læra. Greinirnar í bókini *Læreplaner i børnehaver* eru allar ábending um, at børn á dagstovni læra alla tíðina, eisini í fríum spæli. Eyðsæð er, at strukturin á dagstovninum, har nógv børn eru saman, foreldur ikki eru til staðar, og har pedagogarnir eru ymiskir, er stimbrandi læruumhvørvi fyri børn. Felags fyri ástøðini um læru er, at tað snýr seg í høvuðsheitum um at vera virkin í felagsskapinum við onnur.

Dagstovnurin skal stimbra forvitnið og hugin hjá barninum at læra. Børn læra í samspæli við onnur børn og vaksin, læran er samantvinnað við spæl, uppaling, mentan, umsorgan og undran yvir allar lívsins spurningar. Undranin, spurningar og forvitni hjá barninum má altíð verða grundarlagið undir teimum spurningum, sum námsfrøðingar viðgera og granska saman við børnum.

Dagstovnurin skal stimbra forvitnið og hugin hjá barninum at læra. Umráðandi er, at arbeiðið á dagstovninum verður skipað soleiðis, at børn fáa høvi at knýta vinarbond; tað góða sambandið við onnur børn og vaksin er ein fortreyt fyri læru. Uppgávan hjá pedagoginum er at stuðla upp undir lærutilgongdina hjá øllum børnunum. Tí er tað umráðandi, bæði fyri yngri og eldri børn at fáa avbjóðingar og møguleikar at mennast og læra. Lærumøguleikar eru alt lívið, men tey fyrstu árini eru tey týdningarmestu.

## Læruumhvørvið

Sambært ST sáttmálan hava barnaárini virði í sær sjálvum, og børn hava rætt til at koma til orðanna og hava ávirkan á egið lív. Dagstovnar eiga tí sambært barnarættindarsáttmálanum at byggja sítt virksemi á eina heildarfatan av børnum, har umsorgan, spæl og læra skapa eina heild. Tað er tí ábyrgdin hjá pedagoginum at tryggja, at børnini fáa síni rættindi uppfylt.

Eins og barnarættindarsáttmálin leggja dagstovnalógin og kunngerðin um námsætlanir eisini upp til demokratiska hugsunarháttin. Við tí í huga skulu øll børn hava sama møguleika til at læra.

Uppgávan hjá pedagoginum verður tí at skapa ymisk læruumhvørvi, so øll fáa møguleikan at læra. Í stuttum kunnu vit siga, at tað er ikki barnið, ið skal laga seg til dagstovnin, men at tað er dagstovnurin, ið skal vera til reiðar at møta barninum.

## Niðurstøða

Ætlanin er, at kunngerðin skal setast í gildi í 2011. Sjálv meti eg, at námsætlanir kunnu verða við til at gera námsfrøðiliga arbeiðið sjónligari og bøta um dygdina á námsfrøðiliga arbeiðinum, sum longu er á dagstovnunum.

Fyri okkum, sum starvast við námsfrøðiligari ráðgeving, verður tað umráðandi at tryggja, at læruumhvørvið verður so fjøltáttað, at øll børn hava møguleika at læra.

Ein av vansunum kann verða, at barnagarðsarbeiðið einans fer at snúgva seg um læru, og at týdningurin av fríum spæli verður undirmettur. Avbjóðingin má verða, at pláss verður fyri báðum, og at pedagogurin er tilvitaður um, nær tørvur er á fríum spæli ella læru.

Fleiri av dagstovnunum eru byrjaðir at arbeiða við námsætlanum. Hetta er hugaligt, og tað kann bara spyrjast gott spyrjast burtur úr hesum.

Nógv dygdargott námsfrøðiligt arbeiði hevur verið gjørt og verður gjørt á dagstovnunum í Føroyum. Námsætlanir kunnu verða eitt amboð til at gera tað, sum longu er, betri.


*Keldur/bókmentir*

- *Dagstovnalógin: lóg nr. 76 frá mai 2000*
- *Kunngerð um virksemi o.a. á dagstovnum og dagrøktum, mai 2006*
- *ST – barnarættintasáttmálin*
- *Brostrøm, Stig (red). Pædagogiske læreplaner- at arbejde med didaktik i børnehave (2004). Forlaget Systime*
- *Ellegaard, Tomas og Stanek, Anja H. (red). (2004). Læreplaner i børnehaven. Kroghs Forlag.*
- *Honneth, Alex. Behovet for anerkendelse. (2003). Hans Reitzels Forlag.*
- *Illeris, Knud (2006). Læring. Roskilde Universitetsforlag.*
- *Lave, Jean og Wenger, Etienne. Situeret læring. (2003) Hans Reitzels Forlag.*
- *Madsen, Bent. Socialpædagogik (2005) integration og inklusion i det moderne samfund. Hans Reitzels Forlag.*
- *Tetler, Susan og Langager, Søren (red) Specialpædagogik i skolen. En grundbog.*
- *Gyldendal.Nordisk Forlag A/S København (2009).*








Legg framtíðina til rættis

Eik Banki P/F
Tel. 348000
www.eik.fo

Við framtíðarkontuni tryggjar tú børnum tínum eitt betri byrjunarstøði til víðari útbúgving og bústað

Framtíðarkontan hevur høga grundrentu + eykarentu. Upp til 50% av innistandandi kunnu takast út, tá tíðin er komin til víðari útbúgving, og 100% kunnu brúkast til at keypa ella byggja egnan bústað.

MYNDATØKA
Á STOVNUM



VIT HAVA FLEIRI
MYNDAPAKKAR
AT VELJA ÍMILLUM

MØGULEIKI ER AT
BÍLEGGJA EYKAMYNDIR
*í liti, svørt/hvítum ella brúntónaðar*

**Ring og spyr nærri og avtala tíð á tel. 317 111**

FOTOSTUDIO.FO
*við Per á Hædd, Finnur Justinussen og Helenu Dam*


»Framtíðin er tryggjað«
Ein trygg framtíð við Lív
Hjá Lív gert tú eina tryggjandi íløgu í tína framtíð. Verður tú óarbeiðsfør av sjúku ella óhappi, so ert tú kortini fyrireikað og kanst geva tær og tínum eina trygga tilveru.
Sum kundi hjá Lív ert tú í tryggum hondum.
Vit geva tær eina dygdargóða og skilagóða ráðgeving, sum tekur støði í júst tínum tørvi.
www.liv.fo
Innlit í útlit